APRÍL 2022

# LIVANDI MENTAN

## UNESCO-SÁTTMÁLIN
UM VERJU AV SIÐAARVI




MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

## SAMANUMTIKIÐ

- Løgtingið samtykti tann 19. apríl í 2018 at taka undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003. Sáttmálin varð settur í gildi í Føroyum 1. oktober í 2018, sum partur av sáttmálanum fyri danska kongaríkið. Í 2020 varð sáttmálin latin Tjóðsavninum at umsita.

- UNESCO-sáttmálin bindir limalondini at seta mannagongdir í verk, sum tryggja siðaarvinum livilíkindi, harundir at eyðmerkja, skráseta, granska, verja, kunna um, føra víðari (serliga ígjøgnum óformliga og formliga útbúgving), umframt at kveikja nýtt lív í siðaarvin, har tað er neyðugt.

- Við grundstøði í UNESCO-lýsingini av siðaarvi, verður víst á dømi um siðaarv í Føroyum og stovnar, sum røkja hann. UNESCO-sáttmálin bólkar siðaarv í fimm temaøki, sum eru munnligir siðir, útinnan av list, sosialar siðvenjur, ritual og stevnur, vitan og siðvenja viðvíkjandi náttúruna og alheiminum og siðbundin handverk.

- *Greinirnar 11-15* í sáttmálanum, sum eru um landsins verju av siðaarvinum, verða viðgjørdar og settar inn í ein føroyskan samanhang. Yvirskipað skulu limalondini seta í verk tiltøk fyri at tryggja siðaarvin, og at eyðmerkja og allýsa tað, sum hoyrir til siðaarvin á teirra øki. Limalondini binda seg til at menna eina ella fleiri skráir fyri siðaarvin. Í Føroyum hava vit eina skrá, sum hevur heitið "Livandi mentan". Harumframt skulu limalond seta tiltøk í verk, sum tryggja óformligu útbreiðslu av vitan um siðaarvin, og breiða luttøku av øllum í samfelagnum skal tryggjast.

- *Grein 19* fevnir um altjóða samstarv. Tjóðsavnið er við í altjóða arbeiðsbólkum og verkætlanum. Eitt nú er savnsvørðurin á Tjóðsavninum limur í stýrisbólkinum í norska NGO-felagsskapinum Forbundet Kysten, sum arbeiðir við at fremja norrøna súðubygda bátin. Í sambandi við at norrøna súðubygdi báturin er komin á altjóða UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini, arbeiðir bólkurin við at menna felags verjutiltøk.

- Harumframt er Tjóðsavnið vorðin partnari í einari norðurlendskari og baltiskari verkætlan, LIVIND (Creative and Living Heritage as a Resource for the Northern Dimension Region 2021-2023). Henda verkætlanin er samskipað úr Finnlandi og hevur til endamáls at gagnnýta siðaarvin í burðardyggari menning.

- Sambært *grein 29* skulu limalond geva frágreiðing til UNESCO sætta hvørt ár, har gjøgnumgingið verður, hvussu hilnast at seta sáttmálan í verk. Í desember í 2021 lótu Føroyar, saman við Danmark og Grønlandi, eina frágreiðing inn fyri ríkisfelagsskapin.

- Greitt verður frá raðfestingum, hvussu Tjóðsavnið fer at arbeiða við sáttmálanum framyvir. At menna skránna "Livandi mentan" verður høgt raðfest í 2022. Eisini fer nógv orka at vera løgd í eina framsýning um føroysk klæðir, har livandi mentanin knýtt at føroysku klæðunum verður partur av framsýningini.

- Í heyst/vetur í 2022 fara Tjóðsavnið og landsdansifelagið Sláið Ring at arbeiða á at skriva eina tilnevning av føroyska dansinum til altjóða UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv. Væntandi verður innskrivingin latin inn í 2024.

- Ein partur av sáttmálanum snýr seg um verju av siðbundnum handverki. Nú, tá súðubygdi báturin er komin á altjóða listan fyri umboðandi siðaarv fyri mannaættina, eiga tiltøk til frama fyri føroyska bátin og bátasmíð at setast í verk. Tilmælt verður at kanna møguleikarnar fyri at seta á stovn eitt livandi bátasavn.

- Ull er eitt burðardygd tilfeingi, vit hava í Føroyum, men meginparturin av ullini verður burturbeind. Hóast ull ikki longur er Føroya gull, eru nógvir bólkar og einstaklingar, sum fáast við ullavirking. Tilmælt verður, at ikki troyttir møguleikar fyri at gagnnýta ullina verða kannaðir.

- Skúlaverkið er ein týðandi mentanarberi, og siðaarvur er ein aktivur partur av námsætlanum. Tað er tó í stóran mun upp til einstøku lærararnar at samantvinna siðaarv í fráløruni í ymisku lærugreinunum. Ein máti at fremja siðaarvin í fólkaskúlanum er at menna hættir og vitanarskifti millum lærarar um, hvussu siðaarvurin kann knýtast til frálæru í ymsum lærugreinum. Her kann eitt samstarv millum Nám og Tjóðsavnið setast í verk um menning av læraraskeiðum.

- Í samrøðu við hondarbeiðslærarar á Húsarhaldsskúla Føroya og í Tórshavnar kvøldskúla er upplýst, at nógvir næmingar koma úr fólkaskúlanum við lágum førleikum innan hondarbeiði. Um siðbundið, føroyskt hondarbeiði og handverk skal hava lív lagað í framtíðini, so er neyðugt at uppraðfesta hetta í fólkaskúlanum.

1. **INNGANGUR** . . . . . 5
1.1. Heimildin . . . . . 5
1.2. Endamálið við UNESCO-sáttmálanum . . . . . 5
2. **STUTT LÝSING AV MENTANARHUGTAKINUM** . . . . . 6
2.1. Mentanarhugtakið . . . . . 6
2.2. Ávirkan uttanífrá og samfelagsbroytingar – ein stutt, søgulig lýsing . . . . . 7
2.3. Alheimsgerð . . . . . 7
2.4. Siðaarvur sambært UNESCO-sáttmálanum . . . . . 8
3. **VERJA AV SIÐAARVINUM** . . . . . 9
4. **SKILMARKING AV SIÐAARVI SAMBÆRT UNESCO-SÁTTMÁLANUM** . . . . . 10
4.1. Munnligir siðir og málburðir, og harumframt mál sum framburð av siðaarvinum . . . . . 10
4.2. Útinnandi list . . . . . 11
4.3. Sosialar siðvenjur, ritual og stevnur . . . . . 11
4.4. Vitan og siðvenjur viðvíkjandi náttúruni og alheiminum . . . . . 11
4.5. Siðbundin handverk . . . . . 13
5. **SKRÁIN "LIVANDI MENTAN"** . . . . . 14
5.1. Eyðmerking, skráseting, skjalfesting og gransking av siðaarvinum . . . . . 14
5.2. Innkomin uppskot til skránna "Livandi mentan" . . . . . 15
6. **EIN YVIRSKIPAÐUR POLITIKKUR, SUM FREMUR SIÐAARVIN** . . . . . 16
7. **ÚTBÚGVING, TILVITAN OG MENNING AV SIÐAARVINUM** . . . . . 18
8. **BREIÐA LUTTØKU AV ØLLUM Í SAMFELAGNUM** . . . . . 19
9. **ALTJÓÐA SAMSTARV** . . . . . 20
10. **FRÁGREIÐINGAR TIL UNESCO** . . . . . 21
11. **RAÐFESTINGAR OG TILMÆLIR TIL TILTØK FYRI AT TRYGGJA SIÐAARVIN** . . . . . 22
11.1 Skráin "Livandi mentan" . . . . . 22
11.2 UNESCO-sáttmálin og reglugerðir á føroyskum . . . . . 22
11.3 Sameining av viðkomandi aktørum . . . . . 22
11.4 Verju av føroyska bátinum – uppskot um eitt livandi bátasavn . . . . . 23
11.5 Ullavirking . . . . . 23
11.6 Framsýning um føroysku klæðini . . . . . 24
11.7 Tjóðsavnið skal verða innbjóðandi og eitt opið rúm fyri ta livandi mentanina . . . . . 24
11.8 Framhaldandi samstarv við landsdansifelagið Sláið Ring . . . . . 25
11.9 Gransking innan siðaarv eigur at fremjast . . . . . 25
11.10 Skúlaverkið sum mentanarberi . . . . . 25
12. **SAMANUMTIKIÐ** . . . . . 26
13. **KELDULISTI** . . . . . 27

# 1. INNGANGUR

## LØGTINGIÐ SAMTYKTI TANN 19. APRÍL Í 2018 AT TAKA UNDIR VIÐ UNESCO-SÁTTMÁLANUM FRÁ 2003 UM VERJU AV SIÐAARVI.

Sáttmálin varð settur í gildi í Føroyum 1. oktober í 2018, sum partur av sáttmálanum fyri danska kongaríkið. Í 2020 varð sáttmálin latin Tjóðsavninum at umsita. Ein savnsvørður varð settur at samskipa skránna "Livandi mentan" og seta í verk UNESCO-sáttmálan í Føroyum.

### 1.1. HEIMILDIN

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur yvirskipaða ábyrgdina av føroysku undirtøkuni fyri UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003. Sambært sáttmálanum skal umsitingin av sáttmálanum leggjast til ein ella fleiri stovnar at røkja. Uttanríkis- og mentamálaráðið legði í 2020 sáttmálan til Tjóðsavnið at umsita. Tjóðsavnið hevur ábyrgdina av at seta í verk allar lutir í sáttmálanum – at eyðmerkja, skráseta, varðveita og miðla siðaarvin, og at byggja upp netverk við felagsskapir, bólkar, einstaklingar og stovnar við tí fyri eyga at seta skipanir í verk, sum kunnu vera við til at tryggja og menna góðar karmar um siðaarvin. Mentamálaráðið umsitur tann løgliga og politiska partin av sáttmálanum og røkir tað formliga sambandið við UNESCO-skrivstovuna í Paris og við Kulturministeriet í Keypmannahavn.

### 1.2. ENDAMÁLIÐ VIÐ UNESCO-SÁTTMÁLANUM

Endamálið við UNESCO-sáttmálanum er at lata upp fyri, at fólk í øllum heiminum kunnu seta orð á sín egna siðaarv, og á tann hátt tryggja, at siðaarvurin ikki verður gloymdur og kann verða førdur víðari til komandi ættarlið.

UNESCO-sáttmálin kann til fyrimun nýtast í arbeiðinum til menning av ikki bara mentanarpolitikkinum í Føroyum, men eisini á øðrum økjum, so sum t.d. á skúla-, almanna-, umhvørvis-, vinnu- og á heilsuøkinum. Sáttmálin skal roknast sum vegleiðandi, og hann kann lagast eftir umstøðunum og tørvinum í Føroyum. UNESCO-sáttmálin kann nýtast sum eitt amboð at seta eina skipan í verk, sum samsvarar við okkara tørvum, og sum kann økja tilvitskuna um týdningin av og ríkidømi siðaarvsins í Føroyum. Á nógvum økjum er sáttmálin longu í samsvari við føroyskar raðfestingar til fremjan og trygging av siðaarvinum, og tískil eru karmarnir fyri at íverkseta UNESCO-sáttmálan longu til staðar á nógvum økjum. Eitt gott dømi er í fólkaskúlanum, har siðarvurin longu er ein týðandi partur av námsætlanum.

Í mun til altjóða og regional samstørv er sáttmálin eitt hent amboð og ein góð tilvísing til samstarv, vitanarbýti og í orðaskiftum. Føroyar eru við í norðurlendskum UNESCO-netverkum og verkætlanum. Til dømis Forbundet Kysten, sum arbeiðir við at fremja fjarðamentan og varðveiting av norðurlendska, súðubygda bátinum. Eitt samstarv millum Finnish Heritage Agency, Tjóðsavnið, onnur norðurlendsk og baltisk lond er júst sett í verk. Hetta samstarvið skal menna netverk og arbeiðshættir innan siðaarv og burðardyggar menningarverkætlanir uppá tvørs regiónini.



*Føroyskur hjallur við útsýni yvir á Koltur*

MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

# 2. STUTT LÝSING AV MENTANARHUGTAKINUM

**FYRI AT LÝSA SAMANHANGIN, SUM ARBEITT VERÐUR Í, TÁ UNSESCO-SÁTTMÁLIN SKAL SETAST Í VERK, FER HETTA KAPITLIÐ Í STUTTUM AT GERA NAKRAR HUGLEIÐINGAR UM MENTAN OG SAMLEIKA.**

## 2.1. MENTANARHUGTAKIÐ

Tað eru næstan óendaligar nógvar greiningar av mentanarhugtakinum. Til dømis, at mentan er "hin samansetta heildin, ið umfatar kunnleika, átrúnað, list, moral, rættarkenslu, siðir og øll onnur kynstur og vanar, menniskjað hevur ognað sær sum limur í einum samfelagi" (Andreassen, 1996: 24).

Eitt meira "nationalromantisk" mentanarhugtak er, at ein og hvør tjóð hevur ein serligan genialitet, ein serligan anda, sum ger eina tjóð til eina livandi heild. Móðurmálið, virðir, list, arkitekturur og siðir eru har, tann serstaki andin hjá fólkinum kemur til sjóndar (Hastrup, 2006: 9).

Mentan er tillærd og er nakað, vit fáa inn við móðurmjólkini. Í mun til aðrir skapningar, hava menniskju evnini til at hugsa abstrakt, vit duga at gera amboð og fáa nøkulunda tamarhald á náttúruni, vit eru partur av. Vit hava eini evni til at savna saman royndir og lata tær fara víðari gjøgnum ættarliðini, og høvdu vit ikki havt hesi evnini, so hevði eingin mentan verið, og vit høvdu ongan siðaarv havt (Andreassen, 1996: 24).

Eyðun Andreassen (1996: 28-29) hugsar, at tveir grundarsteinar eru í mentan – siðir og egnar royndir. Við siðir vísir hann til søguligu dimensiónina. Fortíðin hevur altíð verið hjartatátturin í mentanini, søgulig vitan ella samanfating av royndum, ið undanfarin ættarlið hava gjørt. Og so er tað okkara egnu persónligu royndir. Hesar kunnu best gagna okkum, tá tær verða settar í høpi við søguliga tilvit og kunnleika, sum vit fáa frá foreldrunum og teimum gomlu, og sum vit læra í skúla og úr bókum.

Broytingin gav eisini vón og bjartskygni, sum var ein onnur treyt fyri tjóðskaparkensluni, tí broytingin vísti, at føroyingar væl kundu vera við í búskaparligari menning (Debes, 1982: 20-21). Jólafundurin í 1888 hevur havt ásýniliga stóran týdning fyri føroyska mentan og tjóðskaparkenslu. Á fundinum skuldi samráðast um at verja Føroya mál og siðir. Her varð málið reinsað og fekk nýtt lív, tey gomlu kvæðini lyft upp sum málsligar og mentanarligar fyrimyndir, og til dømis bleiv føroyski dansurin tikin fram sum serligt føroysk tjóðareyðkenni (Andreasen, 1996: 29).

## 2.2. ÁVIRKAN UTTANÍFRÁ OG SAMFELAGSBROYTINGAR – EIN STUTT, SØGULIG LÝSING

Har, sum landbúnaður hevði verið drívmegin í føroyska samfelagnum frá landnámstíð, byrjaði tann búskaparliga og sosiala kollveltingin í 1878-1880-árunum. Nú broyttist samfelagið frá at vera eitt samfelag við jarðarbrúkarum, til at verða eitt samfelag við fiskimanna- og handilsfólki. Har jarðarbrúkssamfelagið hevði verið eitt meira avbyrgt samfelag, læt henda gongdin samfelagið upp fyri umheimin. Eisini innanhýsis í Føroyum kom meira lív í, umborð á skipum og í handilsbygdum kom fólk saman frá ymsum oyggjum og bygdum.

Tann gamla jarðarbrúksmentanin hevði livað vard og næstan órørd, meðan verkligir og andaligir streymar høvdu broytt heimin uttanfyri. Samanstoyturin við hesar broytingar bar við sær, at føroyingar týðiligari og á ein annan hátt gjørdust varugir við síni fólkaeyðkenni. Tann nýggja tíðin kom við stórum broytingum og avbjóðingum, og reaktiónin móti hesum var tjóðskaparlig. Tó bleiv tann búskaparliga framgongdin ikki bert sæð sum ein hóttan, sum setti alt gott og gamalt í vanda, men eisini sum ein møguleiki.

## 2.3. ALHEIMSGERÐ

Mentan og siðaarvur hava altíð verið undir menning og broyting, men tey globalu hjólini mala alt skjótari. Okkara atgongd og vitan til global viðurskifti eru økt ómetaliga nógv yvir eitt stutt tíðarskeið. Fjølmiðlar og sosialir miðlar gera í stóran mun av, hvat ið hevur týdning, og vit hoyra og síggja tað øll í senn. Hetta skapar ein globalan kunnleika og eitt globalt perspektiv. Hópmentan sum eyðkenni fyri vesturheimin – sjónvarp, sosialir miðlar, alnetið, "populær" tónleikur og so framvegis, hevur upp á stutta tíð brotið nærum øll mentanarmørk niður (Andreassen, 1996: 30). Hetta rákið hevur við sær, at mentan hevur lyndi til at gerast einsháttað kring heimin. UNESCO-sáttmálin hevur til endamáls at stuðla undir siðaarvinum, soleiðis at hann framvegis kann hava sítt livandi virki í samfelagnum. Sáttmálin leggur samstundis dent á, at hóast siðaarvur hevur eina søguliga dimensión, so er siðaarvur livandi, og tillagast støðugt nýggjar umstøður.

## 2.4. SIÐAARVUR SAMBÆRT UNESCO-SÁTTMÁLANUM

UNESCO sáttmálin lýsir siðaarv ella livandi mentan sum nakað, ið verður borið víðari frá ættarliði til ættarlið. Siðaarvurin verður endurskaptur av samfeløgum, bólkum og einstaklingum í samspæli við náttúruna, søguna og samtíðina.

Har siðaarvur fyrr var tikið fyri givið, eru vit í hægri mun noydd at seta orð á hann og tilvitað skapa karmar, sum stuðla undir siðaarvinum. Tá ið Føroyar hava tikið undir við UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi, hava vit møguleikan at brúka henda sáttmálan sum amboð at styrkja og fremja siðaarvin, og harvið tryggja hann til komandi ættarlið.

Í *Universal Declaration on Cultural Diversity* frá 2001 vísir UNESCO á ein sínámillum bundinskap millum ítøkiliga (gripir, tól, brúkslutir) og óítøkiliga mentan (dugnaskapir, siðir, siðbundið handverk) (hereftir verður "óítøkilig mentan" nevnd "siðaarvur"). Eitt dømi er føroyski, súðubygdi báturin (tað ítøkiliga) og handverkið og brúkið (siðaarvurin) av súðubygda bátinum.

Sambært UNESCO er serliga siðaarvurin undir trýsti av alheimsgerðini og tær veldigu broytingartilgongdirnar tað førir við sær. Millum annað hevur alheimsgerðin við sær at ymisleikar og mentanarligt margfeldi kámast burtur. Í oktober í 2003 viðtók UNESCO tí ein sáttmála at tryggja siðaarvin, *Convention for the Safeguarding of the Intangible Cultural Heritage*. Hesin sáttmálin bindur limalondini til aktivt at verja tann partin av mentanini, sum ikki er vardur undir sáttmálanum um verju av ítøkiligum mentanararvi frá 1972 *The Convention for the Protection of the World Cultural and Natural Heritage*.

Í mun til ta ítøkiligu mentanina (bygningsverk og lutir) liggur í orðinum "siðaarvur", at tað er "óítøkiligt" og lýsir, hvussu óstøðugur siðaarvurin er og avbjóðingina í at verja nakað, sum er í støðugari broyting. Men hóast tað, so leggur UNESCO-sáttmálin upp til, at óítøkiligir "mentanargripir", eins og ítøkiligir mentanargripir, verða tryggjaðir fyri nútíðina og eftirtíðina.

*Barnaróður á Norðoyarstevnu*

MYND: JENS KRISTIAN VANG






MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

# 3. VERJA AV SIÐAARVINUM

## UNESCO-SÁTTMÁLIN VERÐUR SETTUR Í VERK VIÐ VERJU OG TRYGGING AV FRAMHALDI AV SIÐAARVINUM Í HUGA.

Grein I í sáttmálanum gevur eina breiða lýsing av, hvussu sáttmálin skal setast í verk, tí sáttmálin leggur upp til, at limalondini gera tað á ein hátt, sum hóskar seg til tað einstaka limalandið.

Sambært grein I í sáttmálanum hevur sáttmálin hesi endamál:

- **At verja siðaarvin**
- **At fremja virðing fyri siðaarvinum hjá týðandi felagsskapum, bólkum og einstaklingum**
- **At økja medvitið um týdningin av staðbundna, tjóðskaparliga og altjóða siðaarv**
- **At útvega altjóða samstarv og stuðul**

Grein 2, stk. 3. vísir til, hvussu verja av siðaarvi skal ella kann fara fram:

Limalondini binda seg til at seta mannagongdir í verk, sum tryggja siðaarvinum livilíkindi, harundir at eyðmerkja, skráseta, granska, varðveita, verja, kunna um, betra um, føra víðari (serliga ígjøgnum óformliga og formliga útbúgving), umframt at kveikja nýtt lív í siðaarvin, har tað er neyðugt. Ein liður í hesum arbeiðinum er at gera eina skrá yvir siðaarvin, og at peningur verður játtaður til at skráseta, granska, viðlíkahalda og fremja siðaarvin.

# 4. SKILMARKING AV SIÐAARVI SAMBÆRT UNESCO-SÁTTMÁLANUM

Sambært grein 2. í sáttmálanum skal siðaarvur skiljast sum:

- **Munnligir siðir og málburð, her umframt mál sum framburð fyri siðaarvinum**
- **Útinnan av list**
- **Sosialar siðvenjur, ritual og stevnur**
- **Vitan og siðvenja viðvíkjandi náttúruna og alheimin**
- **Siðbundin handverk**

At skilmarka siðaarv er trupult. Í flestu førum umboðar siðaarvur meira enn eitt punkt. Til dømis er føroyskur dansur og kvæðamentan ein munnligur siður og málburður, samstundis sum tað er útinnan av list og eisini ein sosial siðvenja. Í hesum kapitlinum verður gjørd ein roynd at flokka siðaarv út frá UNESCO-lýsingini av siðaarvi, soleiðis sum hann verður lýstur í UNESCO-skjalinum *Intangible Cultural Heritage Domains*[1].

## 4.1. MUNNLIGIR SIÐIR OG MÁLBURÐIR, OG HARUMFRAMT MÁL SUM FRAMBURÐ AV SIÐAARVINUM

Sambært UNESCO hava munnligir siðir og málburðir at gera við siðir, so sum skaldskap av mannamunni, sangir og yrkingar, sagnir, søgur, sjónleikur og dialektir. Summir munnligir siðir kunnu verða bundnir til eitt heilt samfelag, meðan aðrir siðir til serligar bólkar ella bygdir. Munnligir siðir kunnu føra vitan, mentanarlig og sosial virðir víðari. Eisini ber tað við sær kollektiv minni, og hervið eru munnligir siðir við til at eyðmerkja samleika í einari mentan.

Móðurmál í sjálvum sær roknast ikki sambært sáttmálanum sum siðaarvur. Hóast hetta verður lagdur stórur dentur á týdningin av móðurmálinum, tá tað snýr seg um at føra munnliga siðaarvin víðari[2]. Móðurmálið er sjálvt kjarnin í framhaldinum av munnligum siðum í einari mentan.

Dømi um munnligar siðir í Føroyum kunna vera kvæðini, sagnir, kórsangur og felagssangur. Staðarnøvn eru ofta knýtt at serligum hendingum úr søgn og søgu, og staðarnøvn hava verið alneyðug fyrr í tíðini, fyri at fólk kundu leiðbeina seg í landslagnum. Nógvur málburður er eisini knýttur at kristindóminum og halgisiðum, og sálmar kunnu eisini roknast sum dømi um munnligar siðir. Til dømis verða sálmar sungnir undir jarðarferð, tá kistan verður borin út úr kirkjuni ella við grøvina fyri at æra tann deyða. Summastaðni er eisini siðvenja at syngja sálmar, áðrenn farið verður eftir fugli ella á fjall í brattlendi ella í sambandi við útróður.

Dialektir ella serligur staðbundin málburður í Føroyum kann eisini vera eitt dømi um mentanarligt fjølbroytni í Føroyum.

Dømi um stovnar, sum røkja henda siðaarv:

- **Føroyamálsdeildin**
- **Bygdasøvnini**
- **Staðarnavnanevndin**
- **Málráðið**
- **Nám**
- **Fólkakirkjan og samkomur**
- **Kringvarp Føroya**
- **Fólka- og miðnámsskúlar**
- **Landsbókasavnið**

1 Kit of the Convention for the Safeguarding of the Intangible Cultural Heritage - intangible heritage - Culture Sector - UNESCO
2 https://ich.unesco.org/en/ich-and-mother-languages

## 4.2. ÚTINNANDI LIST

Sambært UNESCO umfatar hetta evni tónleik, sjónleik, dans og sang. Tónleikur, sangur og dansur verður framført í ymsum sosialum samanhangum. Í Føroyum er føroyski dansurin, kórsangur, felagssangur og hornorkestur dømi um útinnandi list, har serstakir mentanarligir boðskapir verða samskiftir í ymiskum sosialum og mentanarligum samanhangum.

Dømi um stovnar, sum røkja henda siðaarv:

- **Tjóðpallur Føroya**
- **Sjónleikarafeløg kring landið**
- **TUTL**
- **Fólkakirkjan og samkomur**
- **Musikkskúlar**
- **Landsdansifelagið Sláið Ring og tey lokalu dansifeløgini**
- **Kringvarp Føroya**

## 4.3. SOSIALAR SIÐVENJUR, RITUAL OG STEVNUR

Sambært UNESCO eru sosialar siðvenjur, ritual og stevnur ofta knýtt at lívsskeið frá føðing til deyða, sum til dømis føðing, brúdleyp og jarðarferð. Hetta kann knýtast til halgidagar og merkisdagar. Felags fyri allar sosialar siðvenjur, ritual, festivalar og høgtíðir er, at hesi vátta samleikan hjá einum fólki, bólkum og einstaklingum við tí søguliga framhaldinum og bindur fortíð, samtíð og framtíð saman.

Sambært UNESCO-lýsingini hava siðvenjur, so sum høgtíðir og halgidagar, ein rituellan dám í tann mun, at hesi verða fylgd av dagligum, vikuligum, mánaðarligum ella árligum endurtøkur. Her er sostatt eitt mynstur, sum fylgir einari serligari raðfylgju, sum gevur meining, og sum skapar eitt slag av samhaldsfesti, samanhaldi og samleika.

Tað kunnu vera siðvenjur, sum alt Føroya fólk útinnir, ella sum partar av fólkinum útinna. Til dømis er vanlig siðvenja at gera meira ella minni burtur úr føstulávint allastaðni í Føroyum, men í Sumba hava tey ein heilt serligan hátt at halda føstulávint, sum skilir seg frá føstulávintshaldi aðrastaðni.

Spæl og ítróttur verða eisini av UNESCO bólkað samsvarandi, sum til dømis at spæla blikka og lækka paradís í skúlagarðinum ella at íðka ítrótt, so sum kappróður.

Dømi um stovnar sum røkja hendan siðaarv:

- **Fólkakirkjan og samkomur**
- **Róðrar- og bátafeløgfeløg**
- **Nevndir í feløgum og kommunum sum fyrireika hátíðarhald, tiltøk og stevnur**

## 4.4. VITAN OG SIÐVENJUR VIÐVÍKJANDI NÁTTÚRUNI OG ALHEIMINUM

Vitan og siðvenjur viðvíkjandi náttúruna og alheiminum fevnir um dugnaskapir, siðvenjur, vitan og fatan av náttúruni, sum er skapt í samspæli við umhvørvið.

Í Føroyum liva vit tætt at náttúruni, og hon hevur verið og er enn týdningarmikil fyri okkara lívsgrundarlag. Seyðahald, grindadráp, fuglaveiða og útróður eru ikki longur lívsneyðug, men er hóast hetta ein týdningarmikil partur av tí, vit eta úr okkara nærumhvørvi. Hetta verður tó ikki bert útint fyri at fáa mat á borðið, men eisini tí at hetta umboðar ein sosialan og mentanartreytaðan felagsskap millum menniskju. Í rættini verða børn og yngra ættarliðið hildin til og læra frá eldra ættarliðinum. Soleiðis verður dugnaskapur og vitan um til dømis seyðahald ført víðari.



*Turt kjøt og ræstur fiskur*

MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

At fara á fjall, í grind, á fuglaveiðu ella til útróðrar, at hagreiða og nýta tað, vit fáa burturúr í okkara nærumhvørvi, er siðaarvur knýttur at dugnaskapum og vitanum um náttúruna og kann vera við til at skapa ein staðbundnan samleika og samanhald.

Í Føroyum er "føroyskur matur" enn høgt virðismettur, og í hátíðarhaldum sum konfirmatión og á ólavsøku er vanligt at borðreiða við turrum tvøsti og spiki, skerpikjøti og turrum fiski. At ræsa og turka mat vóru varðveitsluhættir, sum vóru alneyðugir, áðrenn kuldaskáp og frystiboksir vóru til. Hetta hevur verið ført í arv líka til tann dagin í dag. Vitan og dugnaskapur, tá tað snýr seg um at ræsa kjøt og fisk og at gera garnatálg eru gingin í arv gjøgnum ættarliðini. Í dag er tað í stóran mun innan óformliga og formliga útbúgving at henda vitanin verður førd víðari til yngru ættarliðini, eitt nú í háskúlum og í fólkaskúlanum.

Onnur dømi um vitan og dugnaskapir viðvíkjandi náttúruni kann vera fiskimið, vitan og røkt av føroyska rossinum, røkjan av fuglabjørgum, epla- og rótavelting og ullavirking.

Dømi um stovnar, sum røkja hendan siðaarv:

- **Búnaðarstovan**
- **Bóndafelagið**
- **Meginfelag útróðrarmanna**
- **Mat- & moldmentanarháskúlin á Sandi**
- **Føroya húsarhaldsskúli**
- **Útoyggjafelagið**
- **Felagið føroysk ross**
- **Tjóðsavnið**
- **Havstovan**
- **Veðurstovan**
- **Grindamannafelagið**

## 4.5. SIÐBUNDIN HANDVERK

Siðvenjur innan handverk koma til sjóndar í ítøkiligum verkum. Tað kann til dømis vera grindaknívar, silvur til føroysk klæðir, troyggjur, vovin fyri- og turriklæði, broderí og føroyski, súðubygdi báturin. UNESCO-sáttmálin er ikki um at verja hesi ítøkiligu handverkini, men um at verja dugnaskapin, vitanina og brúkið handan handverkini.

Ein hóttan móti hesum siðaarvinum í nútímans samfelagnum er modernisering og mekanisering. Til dømis er føroyski, súðubygdi báturin skiftur út við glastrevjabátin, sum er bíligari og krevur minni viðlíkahald, og tí er vandi sostatt fyri, at handverkið doyr út. Skal handverkið innan bátasmíð tryggjast fyri framtíðina, er neyðugt at kanna, hvussu føroyski báturin kann gerast viðkomandi í nútímans samfelagnum.

Tað sama er galdandi fyri handverkið innan virking av føroyskari ull og gagnnýtslu av hesum tilfeingi í nútímans samfelagnum. Skal vitan um virking av ull tryggjast fyri framtíðina, eiga hættir at gera ullina viðkomandi í samtíðini at kannast.

Innan varðveiting av siðbundnum handverk, er tað í nógvum førum almennur, fíggjarligur stuðul, sum skal til. Her er tað sjálvsagt neyðugt at viga búskaparligt og siðsøguligt virði upp ímóti hvørjum øðrum.

Dømi um stovnar, feløg og einstaklingar, sum røkja henda siðaarv:

- **Kvøldskúlarnir**
- **Húsarhaldsskúli Føroya**
- **Heimavirkisfeløgini**
- **Føroyskir sniðgevar – til dømis Guðrun & Gurðun, Shisha Brand, Navia**
- **Bátasmiðir**
- **Bátafeløg**
- **Bygdasøvn**
- **Róðrarsamband Føroya**
- **Róðrarfeløgini**
- **Tjóðsavnið og bygdasøvnini**
- **Útoyggjafelagið**

*Teinaringur verður smíðaður*

MYND: JENS KRISTIAN VANG



# 5. SKRÁIN “LIVANDI MENTAN”

Sambært *grein 11* skulu øll limalond seta í verk neyðug tiltøk fyri at tryggja siðaarvin, og at eyðmerkja og allýsa tað, sum hoyrir til siðaarvin í teirra øki. Hetta skal gerast við luttøku av samfeløgum, bólkum, felagsskapum og einstaklingum. Øll limalond binda seg sambært *grein 12* til at menna eina ella fleiri skráir fyri siðaarvin á teirra øki, við tí fyri eyga at verja. Skráirnar skulu dagførast regluliga. Í Føroyum hava vit eina skrá, sum hevur heitið “Livandi mentan”. At menna skránna “Livandi mentan”, er ein týdningarmikil liður í arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum í Føroyum. Harafturat, fyri at eitt evni kann koma á altjóða UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv fyri mannaættina, er tað eitt krav, at tað fyrst er á einum tjóðarlista fyri siðaarv.

Tað stendur øllum felagsskapum, bólkum og einstaklingum, sum útinna siðaarv, í boði at senda uppskot inn til skránna “Livandi mentan”.

Arbeiðið við skránni “Livandi mentan” hevur fleiri funksjónir:

- **skráin verður ment við verju av siðaarvinum fyri eyga**
- **skráin er ein fagnaður av fjølbroytta siðaarvinum í Føroyum**
- **skráin fer at økja medvitið um týdningin av siðaarvi; yvirhøvur**
- **skráseting og gransking av siðaarvinum**
- **skráin fer at eggja til luttøku av samfeløgum, bólkum og einstaklingum**

## 5.1. EYÐMERKING, SKRÁSETING, SKJALFESTING OG GRANSKING AV SIÐAARVINUM

Uppgávan at umsita UNESCO-sáttmálan fevnir um at útinna grundgransking og at innsavna dátu, í tøttum samstarvi við mentananrútinnarar og berarar. Hetta verður gjørt sum ein liður í arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum og dagliga savnsarbeiðinum.

Uppskotini, sum koma inn til skránna “Livandi mentan”, lýsa í stuttum siðaarvin. Tá ið uppskot koma inn hevur tað stóran týdning framhaldandi at arbeiða við innsavning og skjalfesting.

Tilfarið, sum Tjóðsavnið savnar inn, verður skrásett talgilt í SARA. SARA er ein felags skrásetingarskipan fyri øll søvn í danska kongaríkinum. Henda skipanin er gjørd til skráseting av ítøkiligum mentanargripum, men Tjóðsavnið hevur funnið ein hátt at skráseta teir óítøkiligu gripirnar (siðaarvin). Tað, sum verður skrásett, eru Mp3-fílar við bandaðum samrøðum, PDF-fílar við avskrivaðum samrøðum, myndir, skannað skjøl, so sum gamlar uppskriftir av ullavaski, gamlar avís- og blaðgreinar, filmar og brøv, sum vísa samskifti millum fólk. Liggur tilfarið á SARA, verður tað varðveitt. Hetta tilfarið kann nýtast av granskarum, og í miðling av siðaarvinum í framsýningum og greinum. Kensluligar upplýsingar og frágreiðingar givnar í trúnaði verða ikki almannakunngjørdar.




Fittir ólavsøkugestir í føroyskum klæðum

MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

## 5.2. INNKOMIN UPPSKOT TIL SKRÁNNA "LIVANDI MENTAN"

At seta føroyska siðaarvin á skrá er eingin einføld uppgáva. Sambært punkt 6 í *Etisku meginreglunum til verju av siðaarvinum*, eigur siðaarvur ikki at verða mettur av uttanhýsis metarum. Tað er fólkið - felagsskapir, bólkar og einstaklingar, sum gera av, hvat skal setast í skránna. Her hevur týdning, at skráin ikki ger mun á siðaarvi. Eingin siðaarvur er betri ella hevur størri týdning enn nakar annar. Alt, bæði stórt og smátt, kann koma á skránna. UNESCO- sáttmálin leggur stóran dent á "inklusivitet" og breiða umboðan í uppskotunum til skránna "Livandi mentan". Tað kann verða ilt at meta um, nær umboðanin er nóg breið, men tað er ein meting sum verður gjørd í mun til einstøku uppskotini.

Savnsvørðurin, ið umsitur sáttmálan á Tjóðsavninum, tekur ímóti og samskiftir við feløg, bólkar og einstaklingar um uppskotini til skránna. Aftur at sær hevur savnsvørðurin ein óformligan bólk við umboðum frá Tjóðsavninum, Uttanríkis- og mentamálaráðnum og Fróðskaparsetri Føroya, ið umrøða uppskotini og eftirkanna, at tey eru í tráð við leiðreglurnar í sáttmálanum. Um hildið verður, at eitt uppskot uppfyllir krøvini, kann tað verða sett í skránna "Livandi mentan". Í summum førum kann verða neyðugt at tillaga uppskotið, og tá verður tað altíð gjørt í tøttum samstarvi við tey, sum hava latið uppskotið inn. Í ávísum førum kann eitt uppskot verða avvíst, til dømis um tað verður brúkt til at fremja ávís politisk áhugamál, ella um uppskotið í nóg stóran mun ikki umboðar tey, ið útinna siðaarvin.

# 6. EIN YVIRSKIPAÐUR POLITIKKUR, SUM FREMUR SIÐAARVIN

*Grein 13:* Fyri at tryggja verju, menning og fremjan av siðaarvinum innan teirra økið, skulu øll limalond stremba eftir at,

a) *viðtaka ein yvirskipaðan politikk, sum fremur týdningin av siðaarvinum í samfelagnum, og samantvinnar verju av siðaarvinum í ráðleggingararbeiði,*

*UNESCO-sáttmálin um verju av siðaarvinum, Etisku prinsippini* og *Nýtslureglugerðina til at seta UNESCO-sáttmálan í verk*, eru týdd til føroysk. At umseta hesi arbeiðsskjøl skapar ein staðbundnan málburð og er við til at laga arbeiðið við sáttmálanum eftir føroyskum umstøðum. Hesi skjøl eiga at verða almenn og latin øllum ráðum og almennum stovnum, soleiðis at siðaarvurin er viðtikin í ráðleggingararbeiði og í politiskum átøkum yvirhøvur. Tað er ikki bert á mentanarøkinum at sáttmálin er viðkomandi, men eisini á skúlaøkinum, í kommunumálum, heilsumálum, umhvørvismálum, vinnumálum, gransking, fíggjarmálum uttanríkismálum og øðrum, eigur siðaarvurin at verða tikin við í ráðleggingararbeiðið.

b) *at útnevna ella stovna ein ella fleiri skikkaðar stovnar, sum skulu verja siðaarvin í teirra øki,*

Tjóðsavnið hevur fingið álagt at seta sáttmálan í verk, sum liður í hesum at menna og røkja skránna "Livandi mentan", at seta møgulig verjutiltøk í verk har tað er neyðugt, og samskipa og seta í verk skipanir og samstørv við stovnar og mentanarútinnarar.

c) *stuðla vísindaligum, tøkniligum og listarligum kanningum, umframt granskingarháttaløgum við tí í huga at verja siðaarvin, her undir serliga tann hótta siðaarvin,*

Sum heild eru góðir karmar fyri gransking í Føroyum, men í løtuni er lítið granskað í siðaarvi og verju av siðaarvi. Føroyar hava verið við í ES granskingarætlanini Horizon síðan 2010. Fram til 2020 hava Føroyar verið tilknýtt at Horizon 2020 "The Framework Program for Research and Innovation" (2014-2020). Í 2021 gjørdu Føroyar eina avtalu við ES um Horizon Europe (2021-2027), sum er ein karmur fyri gransking og nýskapan. Harafturat er ein umsókn liggjandi um at sleppa við í ES mentanarsamstarvið Creative Europe. Hesi ES granskingarsamstørv fevna eisini um mentan og siðaarv. Her eru sostatt góðir møguleikar fyri at søkja ES stuðul til gransking innan siðaarv. Hetta eigur at fremjast.

d) *at seta gagnlig løgfrøðilig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk í verk fyri at:*

i. *seta á stovn ella at styrkja stovnar, sum undirvísa í fyrisiting av siðaarvinum, og at bera siðaarvin víðari í hóskandi umstøðum og høvum, sum eru ætlað endamálinum at útinna ella bera fram hendan siðaarvin,*

Í Føroyum hava vit fleiri stovnar, sum fremja siðaarvin í ymsum umstøðum. Til dømis:

- **Dansifeløgini bera fram og fremja føroyska dansin og kvæðamentan.**
- **Útoyggjafelagið arbeiðir við at menna útoyggjarnar, har siðaarvurin er ein týðandi partur av hesum virksemi.**
- **Bátasøvn, bátafeløg og kappróðrarfeløg bera víðari og fremja føroyskar bátasiðir.**
- **Búnaðarstovan innsavnar ull og hevur breiða vitan um ullavirking, seyðahald og jarðarbrúk og umsitur tey føroysku rossini.**
- **Bæði óformligir og formligir útbúgvingarstovnar, so sum Føroya Húsarhaldsskúli, kvøldskúlarnir, háskúlarnir, fólka og miðnámsskúlin og hægri útbúgvingarstovnar bera víðari vitan um eitt nú siðbundna matmentan, handverk, bátasmíð, hondarbeiði, m.a. virking av føroyskum klæðum.**

Í samband við at seta UNESCO-sáttmálan í verk, hevur Tjóðsavnið havt samband við nakrar av hesi omanfyri nevndu. Tað er eitt ynski at fáa eitt sterkt netverk við hesi.

> *ii. tryggja atgongd til siðaarvin við atliti at vanligari siðvenju, sum skipar atgongd til serligar partar av hesum siðaarvi,*
>
> *iii. seta á stovn skjalagoymslur til siðaarvin og at gera atgongd til hesar lættari.*

Savnsgull og savnið hjá Kringvarpinum eru góð dømi um skjalagoymslur fyri siðaarvin. Sambært ársfrágreiðingina frá Savnsgull 2020, verður alt analoga savnið talgilda í 2023. 521.179 pappírsskjøl, 26.846 útvarpsbond og væl omanfyri 14.000 sjónvarpsbond frá árini 1957-2000. Kringvarpssavnið hevur skjalgoymt tilfar eftir 2020.

Hesar skjalagoymslur eru atkomuligar, men tó enn avmarkaðar í atgongd vegna upphavsrætt og vantandi heimild at útflýggja sumt tilfar.

Føroyamálsdeildin hevur eitt talgilt etnografisk og søguligt bandasavn, har tað, sum tey hava fingið heimild at almannakunngera, er tøkt á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetur Føroya.

Á Landsbókasavninum skráseta tey handrit, og í 2016 var farið undir við at almannakunngera tey á teirra heimasíðu. Hesi handrit eru ikki vard av upphavsrætt, og kunnu frítt endurgevast.

Sum frá líður, og tá meira gongd er komið á arbeiðið við skránna Livandi mentan, gevur tað meining at Tjóðsavnið fer at menna eina atkomuliga skjalagoymslu yvir siðaarvin.

Tað er nógv atkomuligt skrivligt tilfar um siðaarv í Føroyum. Dømi um skrivligt tilfar, sum lýsir siðvenjur og vanligt gerandislív, eru bøkurnar hjá Jóan Paula Joensen, Eyðun Andreassen og Robert Joensen. Onnur dømi er bókin um ull, "*Seyður, ull og tøting*", hjá Nicolinu Jensen Beder og bókin um føroyska róðrarbátin, "*Hin føroyski róðrarbáturin – sjómentir føroyinga í eldri tíð*", hjá Andras Mortensen. Eisini eldri tilfar hjá Hans Marius Debes, Jens Christian Svabo, Lucas Debes, V.U. Hammershaimb ella heilt aftur til Seyðabrævið og Tingbøkurnar er atkomuligt fyri almenninginum. Tó manglar eitt skipað yvirlit yvir alt gamalt og nýtt tilfar um føroyskar siðvenjur og fólkalív. Tað hevði verið gagnligt at ment eitt slíkt yvirlit. Hetta arbeiði kann skipast í samstarvi millum Tjóðsavnið og Landsbókasavnið.

# 7. ÚTBÚGVING, TILVITAN OG MENNING AV SIÐAARVINUM

*Grein 14* – Øll limalond eiga við gagnligum miðlum at stremba eftir:

a) *tryggja tilvitsku um, virðing fyri og betring av siðaarvinum í samfelagnum serstakliga við at:*

i. *seta í verk útbúgvingar og tiltøk fyri at gera almenningin – serstakliga ung fólk – tilvitaðan,*

ii. *seta í verk serligar útbúgvingar í viðkomandi bólkum og samfeløgum,*

iii. *seta í verk mennandi virksemi til verju av siðaarvinum, serstakliga fyri leiðslu og vísindaliga gransking,*

iv. *og tryggja óformliga útbreiðslu av vitan.*

Verksetan av UNESCO-sáttmálanum um verju av siðaarvi í Føroyum er ein gyltur møguleiki fyri Tjóðsavnið og bygdasøvnini at endurnýggja framsýningarnar og menna undirvísingartilfar um siðaarv fyri børn og ung. Á Tjóðsavninum er hetta arbeiði longu byrjað. Ein framsýning um ull lat upp í summar og framsýningar um føroysk klæði eru í gerð.

Tann 14. desember í 2021 varð norrønu súðubygdi báturin innskrivaður á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini. Í hesum sambandi er ein lítil framsýning gjørd um UNESCO-sáttmálan og norrøna súðubygda bátin. Eitt alment tiltak um verju av føroyska bátinum skuldi verið í samband við innskrivingina, men varð útsett vegna korona. Hetta tiltakið verður hildið á vári 2022.

Eitt samstarv millum Nám og Tjóðsavnið kann fáast í lag fyri at menna læraraskeið í siðaarvi. Til dømis hava Nám, Sláið Ring og Tjóðsavnið samstarvað um eitt læraraskeið, sum varð hildið á Gjáargarði við Gjógv á vetri 2021. Skeiðið hevði til endamáls at deila vitan um kvæði, føroyskan dans og arbeiðshættir í skúlahøpi. Eftir ætlan verður partur av tilfarinum savnaður og lagaður til skúlabrúks. Hetta var eitt væleydnað skeið, og tað eru nógvir møguleikar fyri at skipa fyri fleiri skeiðum innan serlig økir av siðaarvinum, ella hvussu siðaarvur sum heild kann takast við í undirvísingini í teimum ymisku lærugreinunum.

b) *greiða almenninginum frá um hóttanirnar móti siðaarvinum og um tað virksemi, sum verður sett í gongd sambært hesum sáttmála,*

Her er tað ráðiligt at Tjóðsavnið traðkar meira fram og leggur størri dent á at miðla og skapa áhuga um tað sum verður sett í gongd sambært sáttmálanum. Skráin Livandi mentan er eitt gott amboð í hesum arbeiði.

c) *menna útbúgving til frama fyri verju av náttúruøkjum og støðum, sum eiga at varðveitast, og sum eru neyðug fyri siðaarvin.*

Har er eitt samband millum siðaarvin (tað óítøkiliga) og ítøkiliga mentanar- og náttúruarvin. Støð í býar/bygdaøkjum ella á náttúruplássum kunna hava eginleikan at konkretisera mentanina hjá einum fólki. Støð sum umboða siðaarv í Føroyum eru til dømis rættirnar, fuglabjørgini, havið, hagin, kirkjur, standmyndir, neyst og gamlir býlingar. Verju av náttúruøkjum og støðum í býar/bygdamyndina kunnu til fyrimun verða fevnd í námsætlanum í fólka- og miðnámsskúlum.

# 8. BREIÐA LUTTØKU AV ØLLUM Í SAMFELAGNUM

*Grein 15 – Samfelagsluttøka, bólkaluttøka og persónsluttøka*

*"Øll limalond skulu stremba eftir, at so stórur partur av samfelagnum, bólkum og persónum, skapa, røkja og bera víðari ein slíkan mentanararv innanfyri karmarnar, sum eru til verju av siðaarvinum, og somuleiðis at taka tey við í umsitingina av hesum".*

Sáttmálin leggur upp til eitt "bottom up" virksemi, og samfelagsbólkar, stovnar og einstaklingar skulu verða við í umsitingini, skrásetingini og í verjutiltøkum, sum verða framd.

Hetta merkir, at í arbeiðinum at seta í verk sáttmálan, skal takast hædd fyri, at siðaarvurin skal hava sítt livandi virki í samfelagnum, samstundis sum siðaarvurin ikki verður avmarkaður til umsitingarligar karmar. Í umsitingini av siðaarvi er ein vandi fyri, at serfrøðingar og "bureakratar" taka mentanarberarar av ræði, og siðaarvurin verður frystur og formskipaður. Tað hevur týdning, at vit alla tíðina eru varug við, hvør ið umboðar hvønn í arbeiðinum við siðaarvinum.

*Skeið fyri lærarar í føroyskum dansi á Gjáargarði*

MYND: KRISTINA DJURHUUS CHRISTIANSEN



# 9. ALTJÓÐA SAMSTARV

*Grein 19 – Altjóða samstarv*

Í hesum sáttmála verður altjóða samstarv millum annað at skilja sum samskifti og samstarv um upplýsingar og royndir, felags átøk og viðtøku av stuðli til limalond í teirra roynd at tryggja siðaarvin.

Uttan at tað skal avmarka ásetingarnar í viðkomandi landsins løgum, vanligum løgum og mannagongdum viðurkenna limalondini at trygging av siðaarvinum er gott fyri menniskjuna og binda seg til at samstarva á sínámillum, staðbundið, landsparta- og á altjóða støði.

Sáttmálin leggur sostatt upp til altjóða samstarv og Tjóðsavnið tekur lut í norðurlendskum arbeiðsbólkum og netverkum.

**Norðurlendsk samstarv um norrøna súðubygda bátin**
Síðan 2015 hava norðurlendsk bátafeløg, bátasmiðir og søvn arbeitt miðvíst við at fáa norrøna súðubygda bátin á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættina. Tað var norska Forbundet Kysten, ið samskipaði hetta arbeiði av fyrstan tíð. Tá ein felagsumsókn varð send UNESCO í mars 2020, var tað norska mentamálaráðið, ið samskipaði arbeiðið við umsóknini vegna øll tey norðurlendsku londini. Á heystið 2021 kom fráboðan frá UNESCO um tilnevningin var fyribils góðkend, og tann 14 desember 2021 var felags tilnevningin um at fáa norruna súðubygda bátin, harundir føroyska bátin, á UNESCO listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini. Hetta var fyrst evnið, ið Føroyar hava fingið á listan hjá UNESCO.

**Forbundet Kysten** er ein UNESCO-viðurkendur NGO-felagsskapur, sum arbeiðir fyri at styrkja og tryggja framhald av norrønu súðubygda bátinum, bátasmíði og fjarðamentan. Savnsvørðurin á Tjóðsavninum er við stýrisbólkinum og luttekur í fundum regluliga. Í samband við at norrønu súðubygdi báturin er komin á UNESCO listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættina, fer bólkurin at menna felags verjutiltøk. Eisini fer bólkurin at skipa fyri einari ráðstevnu í 2023 á Víkingasavninum í Roskilde, og fyrireikingar og samskipan av hesa ráðstevnu byrjar í fyrru helvt av 2022.

**Nordic Baltic UNESCO Network of Focal Points** er eitt netverk fyri samskiparar av UNESCO-sáttmálanum. Her verður vitan, arbeiðshættir, ivamál og felags mál viðgjørd.

**LIVIND (Creative and Living Heritage as a Resource for the Northern Dimension Region 2021-2023)** er ein verkætlan, sum er sett í verk av Finnish Heritage Agency. Tjóðsavnið er partnari í hesi verkætlan, saman við 10 øðrum frá norðurlendskum og baltiskum londum. Høvuðsendamálið er at gagnnýta siðaarvin í burðardyggari menning. Hetta verður gjørt við at savna myndugleikastovnar, NGO og fólk, sum á ymsan hátt arbeiða við siðaarvinum. Gjøgnum netsetur, netbornar verkstovur og skeið fara vit at eyðmerkja og menna politikkir, sum kunna styrkja møguleikarnar fyri at gagnnýta siðaarvin í burðardyggum menningarátøkum. Endamálið er at økja førleikar og deila vitan millum virkandi leikarar innan siðaarvsøkið, at styrkja sivilsamfelagið, og styrkja netverkið millum virkandi leikarar og fyrisitingarligar stovnar.

Hóast verkætlanin fyrst og fremst verður sett í verk talgilt, eru tvær ferðir 1000 EUR til taks til hvørt landið, sum kann nýtast til eina lokala verkstovu og eina undanverkætlan. Her fer Tjóðsavnið millum annað at arbeiða við at ullavirking.

Verkætlanin er bygd upp um Agenda 2030 um burðardygga menning og heimsmálini um mentanarliga-, sosiala-, vistfrøðiliga- og búskaparliga burðardygd.



*Eystara vág í Havn*

MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

# 10. FRÁGREIÐINGAR TIL UNESCO

*Grein 29 – Frágreiðingar frá limalondum*

*"Limalondini skulu senda inn frágreiðingar um lógar-, fyriskipanar- og onnur tiltøk, sum verða sett í verk til Nevndina við atliti at tí reglusemi og fyrimynd, sum er ásett av Nevndini".*

Sætta hvørt ár skulu limalond skriva eina frágreiðing til UNESCO um hvussu tað hilnast at seta sáttmálan í verk. Í desember 2021 lat ríkisfelagsskapurin eina frágreiðing inn til UNESCO.

Frágreiðingin gjøgnumgongur átta temaøki:

1. **Stovnsligir og menniskjasligir førleikar**
2. **Útbúgving (óformlig og formlig)**
3. **Skráseting og gransking**
4. **Politisk, løglig og fyrisitingarlig átøk**
5. **Leiklutin hjá siðaarvinum og trygging av hesum í samfelagnum**
6. **Økt tilvitska**
7. **Luttøka av samfeløgum, bólkum og einstaklingum og øðrum áhugapørtum**
8. **Altjóða samstarv**

Føroyar eru komnar stutt við at seta sáttmálan í verk, og tí hevur tað ikki verið møguligt at fara gjøgnum øll átta økini til fulnar.

Arbeiðsgongdin byrjaði við einum netbornum skeiði har øll umboðini fyri limalondini í Evropa luttóku. Her fingu vit ráðgeving og venjing í arbeiðshættum til at innsavna dátu.

Ríkisfelagsskapurin lat eina felags frágreiðing inn, og vit hava hvør í sær svarað spurningum, sum eru viðkomandi fyri einstøku londini.

Frágreiðingin umfataði til samans 86 spurningar, og í Føroyum hava vit svarað umleið helvtina av spurningunum. Tað eru serliga óformliga og formliga útbúgvingarøki og gransking, sum høvuðsdentur varð lagdur á.

# 11. RAÐFESTINGAR OG TILMÆLIR TIL TILTØK FYRI AT TRYGGJA SIÐAARVIN

## 11.1 SKRÁIN "LIVANDI MENTAN"

Arbeiðið við frágreiðingini til UNESCO fór við nógvari orku í 2021. Í 2022 er ætlanin at raðfesta arbeiðið við skránna "Livandi mentan", og at menna heimasíðuna til skránna. Føroyskur dansur, føroyski báturin og grindadráp eru higartil einastu evnini á skránni. Arbeitt verður í løtuni við uppskotum um reinavelting, føroysku rossini, ullavirking og kappróður.

Arbeiðið við skránni "Livandi mentan" er ein grundleggjandi partur av arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum. Tað er serliga í hesum arbeiði, at sambond verða skapt og at feløg, bólkar og einstaklingar verða tikin við í arbeiðinum við sáttmálanum. Grundgransking av livandi mentanini er eisini ein grundleggjandi partur av arbeiðinum við skránni "Livandi mentan".

## 11.2 UNESCO-SÁTTMÁLIN OG REGLUGERÐIR Á FØROYSKUM

*UNESCO-sáttmálin, etisku meginreglurnar og nýtslureglugerðin fyri at seta sáttmálan í verk* eru týdd til føroyskt. Siðaarvur og mentan hevur týdning fyri menniskjaliga vælveru og trivnað, og tí eiga hesi skjøl at verða almenn og latin øllum ráðum og almennum stovnum, soleiðis at hædd kann verða tikin fyri UNESCO-sáttmálanum og siðaarvinum í politiskum ráðleggingararbeiði.

## 11.3 SAMEINING AV VIÐKOMANDI AKTØRUM

Tjóðsavnið hevur fingið álagt at seta sáttmálan í verk. Sum liður í hesum arbeiðinum at menna og røkja skránna Livandi mentan, seta verjutiltøk í verk har tað er neyðugt, samskipa og seta í verk skipanir og samstørv við stovnar og útinnarar av siðaarvi.

Fyri at styrkja, fremja og ikki minst breiða út arbeiðið við UNESCO sáttmálanum og siðaarvinum kring landið, er tað viðkomandi at taka bygdasøvnini við í arbeiðinum.

Umframt søvnini, er tað viðkomandi at ráðføra seg við og uppbyggja netverk, ið umfevna um stovnar og feløg, eitt nú Útoyggjafelagið, háskúlar, kvøldskúlar, skúlaverkið, bátafeløg, heimavirkisfeløgini, kappróðrafeløg og Búnaðarstovuna, sum umsita og umboða partar av siðaarvinum.

Útoyggjafelagið er ein týdningarmikil leikari við atliti at siðaarvi, og felagið arbeiðir miðvíst við at fremja siðaarvin á útoyggj. Útoyggjafelagið fremur burðardygga ferðavinnu, hevur skeið í matgerð, matframleiðslu og siðbundnum handverki. Føroya Húsarhaldsskúli, háskúlarnir og kvøldskúlarnir útvega skeið í siðbundnum handverki, hondarbeiði, matgerð og matframleiðslu, og føra harvið tann partin av siðaarvinum víðari.

Ferðavinnan kann hava ávirkan á verjuna av siðaarvi og øvugt. Tí er eitt samstarv við Visit Faroe Islands, lokalu kunningarstovunum og onnur innan ferðavinnuna av týdningi.

## 11.4 VERJU AV FØROYSKA BÁTINUM – UPPSKOT UM EITT LIVANDI BÁTASAVN

Nú tá súðubygdi báturin er innskrivaður á UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv hjá mannaættini, setur hetta krøv til okkum sum samfelag at seta verjutiltøk í verk. Føroyar eru eitt maritimt samfelag, og tí eiga møguleikar fyri at gera eitt livandi bátasavn at kannast. Har eru nógv smærri bátasøvn sum vísa føroyska bátin fram, men sum nú er, er einki livandi savn, har bátasmíð er ein partur av savninum.

Ein partur av UNESCO-sáttmálanum snýr seg um verju av siðbundnum handverki. Handverkið bátasmíð er í vanda fyri at hvørva, tí bátasmiðir verða færri og færri í tali. Eitt livandi bátasavn kann verða við til at halda lív í og skapa áhuga fyri handverkinum.

Tjóðsavnið fer at kanna møguleikarnar fyri samstørvum við bátasmiðum og bátasøvnum um at skapa eitt umhvørvi har bátasmiðir kunnu smíða bátar og har almenningurin kann fáa atgongd og innlit í hetta arbeiði. Eitt slíkt livandi bátaumhvørvi kann skapa áhuga og økja um tilvitskuna um bátasmíð og bátasiðir, bæði í søguligum og samtíðar høpi.

Tá vit hava við siðbundin handverk, vitan og dugnaskapir at gera, sum eru undir trýsti av nýmótansgerð, er tað sjálvsagt neyðugt at finna eina javnvág millum siðsøguligt virði og búskaparligt virði.



*Snælda at spinna á við hond. Ein handsnælda varð nýtt at spinna grovt við, t.d. skipstroyggjutógv og høft*

MYND: KRISTINA DJURHUUS CHRISTIANSEN

## 11.5 ULLAVIRKING

Tað fyrsta árið við arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum hevur verið arbeitt við at kortleggja ullvirking í Føroyum.

Ullvirking er ein siðaarvur í Føroyum, og har eru nógvir bólkar og einstaklingar sum virka ull (nappa, karða, spinna, tøva) og kvøldskúlar kring landið útvega skeið í millum annað veving, spinning og binding. Eisini hava føroyskir sniðgevar og tógvhandlar áhuga í føroyskari ull. Til dømis framleiðir Navia tógv sum er úr 100% føroyskari ull (tó ikki burturav), og sniðgevin Sissal Kristiansen (Shisa Brand) leggur seg eftir einans at brúka føroysku ullina. Í løtuni eru áleið 95% av hennara sniðum gjørd úr 100% føroyskari ull, harav 90% er ólitað. Hetta keypir hon í løtuni einamest frá Navia, men brúkar eisini Skipstroyggjutógvið hjá Snælduni.

Skipstroyggjutógvi hjá Snælduni er 100% føroysk ull, og verður spunnið á spinnaríiðnum hjá Snælduni (tað einasta spinnaríið í Føroyum). Einki vaskarí er í Føroyum, so øll ull verður vaskað í útlondum.

Tað fáast umleið 70 tons av ull um árið í Føroyum, men bert umleið 25 tons verða latin inn til Búnaðarstovuna á árligu ullamóttøkuni. Sambært einari frágreiðing gjørd til Búnaðarstovuna í 2016 – "Innsavning og virking av ull", er ein marknaður fyri ull, men ein avbjóðing er at prísurin fyri rávøruna er lágur í 1. liði. Tað vil siga at bøndurnir, sum skulu lata ullina inn, fáa so lítið fyri hana, at tað fyri nógv betur loysir seg at burturbeina ullina á rættini. Frágreiðingin staðfestir, at var prísurin fyri ull hægri í 1. liði, høvdu ivaleyst meira enn 25 tons komið til høldar.

Ullavirking er krevjandi, og sum nú er, er einki breitt vinnuligt grundarlag fyri ullina. Men hóast ull ikki longur er Føroya gull, so er ullin eitt virðismikið náttúrutilfeingi, vit hava í Føroyum.

Við alsamt størri fokus á burðardyggari menning og á lokalum og stuttfluttum rávørum, eiga ikki troyttir møguleikar fyri at gagnnýta ullina at kannast. Um tað siðsøguliga og mentanarliga virði í ullini verður marknaðarført rætt, kann tað helst bera seg búskaparliga.

Hugtøk sum burðardygg framleiðsla, lokalt náttúrutilfeingi, lívfrøðiligt niðurbrótiligt, umhvørvi og "tann góða søgan" kunnu verða við til at fremja ullina.

Tøknilig gransking av ullgóðsku og kanningar av ikki troyttum møguleikum fyri gagnnýtslu av ullini í Føroyum eigur at fremjast og stuðlast. Umframt at framleiða tógv úr føroyskari ull, eru aðrir møguleikar at gagnnýta ullina. Í øðrum londum, eitt nú í Norra, eru tey farin at brúka ull til taðing og at gera urtagarðsmáttur[3] úr ull heldur enn úr plastikki. Ull verður brúkt sum húsabjálving í summum londum, og tað kann gerast ein kanning av, hvussu væl føroyska ullin er egnað til hetta endamál. Føroyska ullin inniheldur nógv lanolin, sum kann brúkast til millum annað kosmetik.

Tað er ein tørvur á at týðandi partar seta seg saman og orða eina visión og eitt mál fyri ullina. Við partvísari fígging frá LIVIND-verkætlanini, fara Tjóðsavnið og Búnaðarstovan at skipa fyri einari verkstovu á vári 2022, har vit fara at savna viðkomandi partar saman m.a. innan útbúgvingar- og granskingarstovnar, ferðavinnuna, Búnaðarstovuna, Bóndafelagið, sniðgevar og aktørar innan politisku skipanina. Endamálið við hesum fundinum er at seta orð á avbjóðingar, møguleikar, tørv og ynski út frá ymiskum sjónarhornum. Ein lítil undanverkætlan verður sett í verk seinni í 2022. Undanverkætlanin verður møguliga innan marknaðarføring ella tilvitskuøking av ullini sum virðismikið náttúrutilfeingi, alt eftir hvat tørvirnir verða mettir at vera.

## 11.6 FRAMSÝNING UM FØROYSKU KLÆÐINI

Ein arbeiðsbólkur á Tjóðsavninum er settur at gera eina nýggja framsýning um føroysku klæðini við arbeiðsheitinum "Tjóðbúni ella føroysk klæði?". Framsýningin skal lýsa føroysku klæðini í søguligum og samtíðar høpi, og leggja upp til hugleiðingar og kjak um brúkið og týdningin av teimum føroysku klæðunum í dag. "Livandi mentan" er ein partur av hesi framsýningini, og parturin um livandi mentanina í framsýningina skal verða grundað á nýggjari gransking. Várið 2022 verður brúkt til at savna inn tilfar um virking og brúk av føroysku klæðunum. Framsýningin fer millum annað at innihalda virking av búnanum (broderí, veving, binding), broytingar í búnanum og hugburðir til búnan.

## 11.7 TJÓÐSAVNIÐ SKAL VERÐA INNBJÓÐANDI OG EITT OPIÐ RÚM FYRI TA LIVANDI MENTANINA

Visjónin er, at Tjóðsavnið verður eitt opið og innbjóðandi stað fyri felagsskapir, bólkar og einstaklingar, sum útinna siðaarvin. Til dømis hevur nevndin í Sláið Ring tikið samband við Tjóðsavnið um samstarv um Havleik 2022, har yvir 300 fólk úr øllum norðurlondum koma til Føroya at dansa. Í tí sambandi fer Tjóðsavnið saman við fyriskiparunum av Havleik 2022 at skipa fyri fyrilestrum og rundvísing um fornminni, føroyska bátin, føroysk klæðir og ull, soleiðis at luttakararnir eisini fáa innlit í føroyskan siðaarv.

Ein vón er, at fleiri felagsskapir og einstaklingar brúka og samstarva við Tjóðsavnið framyvir, soleiðis at siðaarvurin fær eitt livandi virki á savninum.

3 Norsøk på Tingvoll forskar på om saueull kan erstatte plast i kjøkkenhagar – NRK Møre og Romsdal – Lokale nyheter, TV og radio

## 11.8 FRAMHALDANDI SAMSTARV VIÐ LANDSDANSIFELAGIÐ SLÁIÐ RING

Eitt gott samstarv og samskifti hevur verið millum nevndina í Sláið Ring og Tjóðsavnið um, hvat kann verða gjørt fyri at verja og menna føroyskan dans. Ætlanin er at byrja at skriva eina tilnevning av føroyska dansinum til altjóða UNESCO-listan fyri umboðandi siðaarv. Hetta arbeiðið byrjar í heyst/vetur 2022, og innskrivingin verður allarhelst ikki latin inn fyrr enn í 2024.

## 11.9 GRANSKING INNAN SIÐAARV EIGUR AT FREMJAST

Grundarlagið og karmarnir fyri gransking eru sum heild góðar í Føroyum. Føroyar eru við í ES-granskingarætlanunum og eru sostatt góðir møguleikar fyri at søkja um ES-fígging til gransking innan siðaarvi.

Dømi um gransking kann verða tøkniligar kanningar av ullgóðsku; gransking í ferðavinnu og siðaarv; sambandi millum siðaarv og burðardygga menning; sambandi millum siðaarv og sálarheilsu (til dømis hondarbeiði ella siðaarvur knýttur at náttúruna).

## 11.10 SKÚLAVERKIÐ SUM MENTANARBERI

Fólkaskúlin er eitt gott dømi um eitt øki, har siðaarvurin er ein aktivur partur av námsætlanum. Til dømis er tann føroyski dansurin innskrivaður í fólkaskúlalógina, og tað er fastur táttur at dansa í vetrarhálvuni við næmingunum. Tað er tó í stóran mun upp til einstøku lærarar at samantvinna siðaarv í frálæruni í ymisku lærugreinunum. Til dømis er ójavnt, hvussu væl lærarar eru fyri, tá tað snýr seg um føroyskan dans. Ein máta at fremja siðaarvin í fólkaskúlanum er at fremja hættir og vitanarskifti millum lærarar um, hvussu siðaarvurin kann knýtast til frálæru í ymsum lærugreinum. Harvið kunna lærarar fáa íblástur frá hvørjum øðrum. Her kann eitt samstarv millum Nám og Tjóðsavnið setast í verk um menning av lærarskeiðum til fólka- og miðnámsskúlalærarar, við tí endamáli at samantvinna siðaarv við frálæru í ymiskum lærugreinum.

Sambært lærarum, sum Tjóðsavnið hevur havt samrøður við, er arbeiðsbyrðan hjá teimum stór, og hetta ávirkar góðskuna av frálæruni í siðaarvi. Í samrøðu við hondarbeiðslærarar á Føroya húsarhaldsskúla og í Kvøldskúlanum í Havn er upplýst, at nógvir næmingar koma úr fólkaskúlanum við lágum ella ongum førleikum innan hondarbeiði. Orsøkin kann vera, at tað er ov nógv, sum er álagt lærarum í fólkaskúlanum at koma ígjøgnum við næmingunum, og tí verður undirvísingin í hondarbeiði ov grunn. Um siðbundið, føroyskt hondarbeiði og handverk skal hava lív laga í framtíðina, so er neyðugt at uppraðfesta hetta í fólkaskúlanum, soleiðis at førleikarnir hjá yngra ættarliðinum verða øktir og áhugin fyri siðbundnum handverki og hondarbeiði verður kveiktur.



*Kórsangur á Vaglinum á tjóðarhátíð okkara, ólavsøku*

MYND: ÓLAVUR FREDERIKSEN

# 12. SAMANUMTIKIÐ

**SAMANUMTIKIÐ HEVUR HENDA FRÁGREIÐINGIN GJØGNUMGINGIÐ ENDAMÁLIÐ VIÐ UNESCO-SÁTTMÁLANUM, OG HVUSSU ARBEITT VERÐUR VIÐ SIÐAARVINUM Í FØROYUM Í UNESCO-HØPI.**

Við hesum riti hevur verið roynt at eyðmerkja nakrar av kørmunum fyri arbeiðinum við UNESCO-sáttmálanum, at lýsa arbeiðið, sum er í gongd, og hvør leisturin verður framyvir.

# 13. KELDULISTI

Andreassen, Eyðun, 1996. *Ein roynd at lýsa mentanina*. Í Avmarkaður marknaður – álit til landsstýrismannin í samband við ráðlegging av mentanarpolitikki í framtíðini. Tórshavn

Debes, Hans J. 1982: *Nú er tann stundin...Tjóðskaparrørsla og sjálvstýrispolitikkur til 1906 við søguligum baksýni*, Føroya skúlabókagrunnur. Tórshavn.

Hastrup, Kirsten. 2006. *Den uhåndgribelige kulturarv – en konvention til debat.* Í Begrebet immateriel kulturarv. Kulturministeriets forskningsudvalg. København.

Joensen, Jóan Pauli, 1987: *Fólk og mentan*. Føroya skúlabókagrunnur. Tórshavn.

Johanneson, Ari, 2016. *Innsavnan og virking av ull – búskaparlig frágreiðing*. Búnaðarstovan.

*Fylgiskjøl*

**Fylgiskjal 1:**
Sáttmálin um verju av siðarvi 2003

**Fylgiskjal 2:**
Etisku meginreglurnar til verju av siðaarvinum

FYLGISKJAL I

# SÁTTMÁLIN UM VERJU AV SIÐAARVI

32. aðalfund Undirvísingar-, Vísinda- og Mentanarstovni Sameindu Tjóða (UNESCO) kallað saman í París dagarnar 29. septembur til 17. oktobur 2003,

*sum vísir til* verandi løgskjøl viðvíkjandi altjóða mannarættindi, serliga ta alheims kunngerð um mannarættindi frá 1948, ta altjóða avtaluna um fíggjarlig, sosial mentanarrættindi frá 1966 og altjóða avtaluna um borgarlig og politisk rættindi frá 1966,

*sum hevur atlit til* týdningin av siðaarvinum sum ein grundleggjandi kelda til mentanarligt margfeldi og trygd fyri burðardyggari menning, sum undirstrikað í tilmæli UNESCO um verju av siðbundnari mentan og tjóðminni frá 1989, í alheims kunngerð UNESCO um mentanar margfeldi frá 2001 og í Istanbul kunngerðina, sum var samtykt í triðja Round Table mentamálaráðharrarnar í 2002,

*sum hevur atlit* til ta rótfestu innanhýsis bundinskapin millum siðaarvin og ítøkiliga mentanar- og náttúruarvin,

*sum viðurkennur*, at gongdin í alheimsgerðini og sosialu broytingarnar afturat teimum treytum, sum hesar hava við sær fyri nýggjum samskifti millum felagsskapir, eins og hugtakið ótolsemi, kunnu bera boð um álvarsamar hóttanir um týning, oyðing og spilling av siðaarvinum, serliga orsakað av vantandi orku til verju av hesum,

*sum er varugur við* alheims viljanum til og felags tilvitsku um verju av mannaættarinnar siðaarvi,

*sum viðurkennur*, at felagsskapir, serliga samfeløg hjá upprunafólki, bólkar og í onkrum føri einstøk menniskju, hava ein tíðandi leiklut í framleiðsluni, verjuni, umsitingini og endurskapanini av siðaarvinum, og harvið hjálpir at ríka mentanar margfeldi og menniskjalig skapanarevni,

*sum staðfestur* víðfevnandi ávirkanina av virksemi UNESCO í mun til at gera leiðbeinandi løgskjøl til verju av siðaarvinum, serliga sáttmálan um verju av heimsins mentanar- og náttúruarv frá 1972,

*sum víðari staðfestir*, at enn er eingin bindandi fleirsíðað avtala um verju av siðaarvinum,

*sum tekur atlit til*, at verandi altjóða avtalur, tilmæli og samtyktir viðvíkjandi mentanar- og náttúru-arvinum skal víðkast og endurnýggjast við nýggjum viðtøkum um siðaarvin,

*sum tekur atlit til* tørvin at økja tilvitskuna um týdningin av siðaarvinum og verjuna av hesum, serliga hjá yngru ættarliðunum,

*sum tekur atlit til*, at altjóða samfelagið saman við limalondum við samstarvshugburði og felags stuðuli geva sítt íkast til verju av einum slíkum mentanararvi,

*sum vísir á* skránna hjá UNESCO um siðaarvin, serliga kunngerðina um meistaraverk í mannaættarinnar munnbornum og óítøkiligum arvi

*sum taka atlit til* dýrabara leiklutin, sum siðaarvurin hevur, tá tað kemur til at knýta menniskju tættari at hvørjum øðrum og tryggja samskifti og sátt og semju millum hesi,

*hevur samtykt* hendan sáttmála tann sjeynda dagin í oktobur í 2003.

# I. Almennar viðtøkur

*Grein 1 – Endamál*

Hesin sáttmáli hevur hesi endamál:

a) *at verja siðaarvin,*

b) *at fremja virðing fyri siðaarvinum hjá týðandi samfeløgum, bólkum og einstaklingum,*

c) *at økja medvitið um týdningin av staðbundna, tjóðskaparliga og altjóða siðaarvin*

d) *at útvega altjóða samstarv og stuðul*

*Grein 2 – Allýsingar*

Í hesum sáttmála skulu hugtøk skiljast soleiðis:

1. 'Siðaarvurin': tær royndir, hugmyndir, máliskur, vitan, hegni – umframt amboð, lutir, forngripir og mentanarrúm, sum eru knýtt at hesum – sum samfeløg, bólkar og í onkrum føri einstakir persónar viðurkenna sum partur av teirra mentanararvi. Hesin siðaarvurin verður borin frá ættarliði til ættarlið og verður støðugt endurskapaður av samfeløgum og bólkum ígjøgnum teirra samvirkan við náttúruna og teirra søgu, og gevur teimum eina kenslu av samleika og framhald, og fremur soleiðis eina virðing fyri mentanarligum margfeldi og menniskjans skapanarevni. Í hesum sáttmála verða bert atlit tikin til siðaarvin, sum kann virka saman við verandi altjóða mannarættindalógum eins og við krøvunum um sínámillum virðing millum samfeløg, bólkar og einstakar persónar og um burðardygga menning.

2. ‘Siðaarvurin’, sum er lýstur í stk. 1 omanfyri, vísir seg millum annað gjøgnum:

    a) *Munnligar siðir og málburð, her umframt mál sum framsøgn fyri siðaarvinum,*

    b) *útinnan av list,*

    c) *sosialar siðvenjur, ritual og festivalar,*

    d) *vitan og siðvenjur viðvíkjandi náttúruna og alheimin,*

    e) *siðbundin handverk.*

1. ‘Verja’: tey fyrivarni, sum verja lívsmáttin í siðaarvinum, íroknað eyðmerking, skjalfesting, gransking, varðveitslu, verju, fremjan, betring, at bera víðari, serliga gjøgnum formliga og óformliga útbúgving, eins og at birta nýtt lív í siðaarvin.

2. ‘Sáttmálalond’: lond, ið er bundin í hesum sáttmála, og sum hesin sáttmálin er galdandi fyri.

3. Hesin sáttmálin fevnir eisini um tey øki, sum eru nevnd í grein 33, sum sambært treytunum í hesi greinini gerast partur av hesum sáttmála. Tá er hugtakið ‘Sáttmálalond’ eisini galdandi fyri hesi øki.

*Grein 3 – Sambandið við onnur altjóða løgskjøl*

Einki í hesum sáttmála skal skiljast sum:

a) *broyting av støðu ella skerjing av verju av heimsarvinum sambært 1972 sáttmálanum um verju av heimsins mentanar- og náttúruarvi, sum ein siðaarvslutur hoyrir beinleiðis undir, ella*

b) *ávirkan á rættindi og skyldur hjá sáttmálalondum í einum og hvørjum altjóða løgskjali, sum tey eru partar av, viðvíkjandi andligum rættindum ella til nýtslu av lívfrøðiligum og umhvørvisvinarligum tilfeingi.*

## II. Stovnar í sáttmálanum

*Grein 4 – Aðalfundur hjá sáttmálalondum*

1. Ein aðalfundur verður hervið stovnaður fyri sáttmálalondini, eftir hetta nevndur 'Aðalfundurin'. Aðalfundurin er ovasti stovnur í hesum sáttmála.

2. Aðalfundurin hevur regluligan fund annaðhvørt ár. Hann kann kalla inn til eykafundar, um hann avger hetta, ella um Millumlandanevndin fyri sáttmálan um verju av siðaarvinum biður um hetta, ella um í minsta lagi ein triðingur av sáttmálalondunum biður um hetta.

3. Aðalfundurin samtykkir sjálvur sína starvsskipan.

*Grein 5 – Millumlandanevnd fyri sáttmálan um verju av siðaarvinum*

1. Ein millumlandanevnd er sett á stovn í UNESCO um sáttmálan um verju av siðaarvinum, hereftir nevnd 'Nevndin'. Nevndin er sett saman av umboðum frá teimum 18 limalondunum, sum eru vald av Aðalfundinum, tá hesin sáttmálin kemur í gildi sambært grein 34.

2. Talið á limum í Nevndini verður økt til 24, tá talið av sáttmálapørtum kemur upp í 50.

*Grein 6 – Val av og valskeið fyri umboðum í Nevndini*

1. Umboðini í Nevndini verða vald soleiðis at nevndin umboðar eitt javnt geografiskt býti og verða hesi skift út eftir eini skiftisskipan.

2. Aðalfundurin velur umboðini í Nevndina fyri fýra ár í senn.

3. Tó er valskeiðið fyri helvtina av limunum, sum eru vald í Nevndina fyri fyrstu ferð, avmarka til tvey ár. Eitt lutakast til fyrsta valið avger, hvørji hesi vera.

4. Aðalfundurin skiftir helvtina av umboðunum í Nevndini út annaðhvørt ár.

5. Aðalfundurin skal eisini tilnevna talið av umboðum í Nevndini, sum er neyðugt fyri at fylla tøku plássini.

6. Eitt umboð kann ikki veljast tvey skeið á rað í Nevndina.

7. Limir í Nevndin skulu velja umboð, sum hava viðkomandi førleikar innan ymisku økini í siðaarvinum.

*Grein 7 – Uppgávur hjá Nevndini*

Uttan at avmarka serligu rættindini, sum Nevndin við hesum sáttmála fær, hevur Nevndin hesar uppgávur:

1. at fremja tey mál, ið hesin sáttmáli hevur, at skunda undir at tey vera sett í gildi og at verja, at tey verða fylgd,

2. at vegleiða um hvørjar mannagongdir eru bestar, og at gera tilmæli um tiltøk fyri verju av siðaarvinum,

3. at orða og leggja fram eina ætlan fyri nýtsluna av tilfeinginum, sum grunnurin hevur sambært grein 25, fyri Aðalfundin at góðkenna.

4. at finna møguleikar fyri at økja um fíggjarliga tilfeingið hjá nevndini, og at fremja tey neyðugu tiltøk hesum at frama sambært grein 25,

5. at orða og leggja fram rakstrarætlan fyri fremjan av hesum sáttmála fyri Aðalfundin at góðkenna,

6. at kanna frágreiðingar, sum umboðini í Nevndini senda inn sambært grein 29, og at leggja fram samandráttir av hesum fyri Aðalfundin,

7. at kanna tey ynski, sum umboðini í Nevndini leggja fram, og at taka partsleysar avgerðir um hesi ynski, sum verða ásett av Nevndini og góðkent av Aðalfundinum fyri:

   i. *upptøku á listarnar og uppskot lýst í grein 16, 17 og 18,*

   ii. *tilluting av altjóða stuðli sambært grein 22.*

*Grein 8 – Starvsháttur hjá Nevndini*

1. Nevndin arbeiðir undir Aðalfundinum. Nevndin skal boða Aðalfundinum frá um alt virksemið og um avgerðir til Aðalfundin.

2. Nevndin samtykkir sjálv sína starvsskipan við einum fleirtali á tveir triðingar av limunum.

3. Nevndin kann seta ráðgevandi fyribilsnevndir, sum Nevndin metir verða neyðug fyri at røkja uppgávurnar hjá Nevndini.

4. Nevndin kann bjóða almennum ella privatum felagsskapum ella persónum við viðurkendum førleikum innan siðaarv at luttaka á fundum fyri at hoyra teir um ávísar spurningar.

*Grein 9 – Góðkenning av ráðgevandi felagsskapum*

1. Nevndin tilnevnir felagsskapir, sum ikki eru heftir at politiskum myndugleikum, men sum hava viðurkendar førleikar innan siðaarvin at vera ráðgevar hjá Nevndini til góðkenningar í Aðalfundinum.

2. Nevndin setur eisini fram uppskot um treytir og krøv til eina slíka góðkenning til Aðalfundin.

*Grein 10 – Avgreiðslustova*

1. Avgreiðslustovan í UNESCO hjálpir Nevndini í arbeiðinum.

2. Avgreiðslustovan fyrireikar skjøl hjá Aðalfundinum og Nevndini umframt uppskot til fundarskrá til fundirnar og tryggjar somuleiðis, at avgerðir, sum verða tiknar, verða framdar.

# III. Landsins verja av siðaarvinum

*Grein 11 – Leikluturin hjá limalondunum*

Øll limalond skulu:

a) *seta í verk neyðug tiltøk fyri at verja siðaarvinum innan teirra øki;*

b) *Millum tey verjutiltøk lýst í grein 2, stk. 3 við luttøku av samfelagið, bólkar og aðrar viðkomandi óheftar felagsskapir, at eyðmerkja og allýsa tað, sum hoyrir til siðaarvin í teirra øki.*

*Grein 12 – Skrá*

1. Fyri at vissa eyðmerking við atliti til verju, eiga øll limalond á ein hóskiligan hátt, at skipa eina ella fleiri skrásetingar yvir siðaarvin í teirra øki. Hendan skráin skal javnan dagførast.

2. Tá øll limalond sambært grein 29 javnan senda sínar frágreiðingar til Nevndina, skulu viðkomandi upplýsingar um hesar skráir fylgja við.

*Grein 13 – Onnur verju tiltøk*

Fyri at tryggja verju, menning og fremjan av siðaarvinum innan økið, skulu øll limalond stremba eftir at:

a) *viðtaka ein yvirskipaðan politikk, sum fremur týdningin av siðaarvinum í samfelagnum, og samantvinnar verju av hesum siðaarvi í ráðleggingararbeiði,*

b) *at útnevna ella stovna ein ella fleiri skikkaðar stovnar, sum skulu verja siðaarvin í teirra øki,*

c) *stuðla vísindaligum, tøkniligum og listarligum kanningum, umframt granskingarháttarløgum við tí í huga at verja siðaarvin, her undir serliga tann hótta siðaarvin,*

d) *at seta gagnlig løgfrøðilig, tøknilig, fyrisitingarlig og fíggjarlig tiltøk í verk fyri at:*

   i. *seta á stovn ella at styrkja stovnar, sum undirvísa í fyrisiting av siðaarvinum, og at bera siðaarvin víðari í hóskandi umstøðum og høvum, sum eru ætlað endamálinum at útinna ella bera fram hendan mentanararvin,*

   ii. *tryggja atgongd til siðaarvin við atliti at vanligari siðvenju, sum skipar atgongdina til serligar partar av hesum mentanararvi,*

*iii. seta á stovn skjalagoymslur til siðaarvin og at gera atgongdina til hesar lættari.*

### *Grein 14 – Útbúgving, tilvitan og menning*

Øll limalond eiga við hóskandi miðlum at stremba eftir:

a) *tryggja tilvitsku um, virðing fyri og betring av siðaarvinum í samfelagnum, serstakliga við at:*

   i. *seta í verk útbúgvingar og tiltøk fyri at gera almenningin - serstakliga ung fólk - tilvitaðan,*

   ii. *seta í verk serligar útbúgvingar í viðkomandi bólkum og samfeløgum,*

   iii. *seta í verk mennandi virksemi til verju av siðaarvinum, her undir serstakliga innan leiðslu og vísindaliga gransking, og*

   iv. *tryggja óformliga útbreiðslu av vitan,*

b) *greiða almenninginum frá um hóttanirnar móti siðaarvinum og um tað virksemi, sum verður sett í gongd sambært hesum sáttmála,*

c) *fremja útbúgving fyri verju av náttúruøkjum og støðum, ið bera í sær minni og sum eru alneyðug fyri at orðbera siðaarvin.*

### *Grein 15 – Luttøka av samfeløgum, bólkum og einstaklingum*

Innanfyri karmarnar av verjuátøkum fyri siðaarvin, skulu øll limalond stremba eftir breiða luttøku av samfeløgum, bólkum, og har tað er viðkomandi, av einstaklingum, sum skapa, røkja og bera víðari ein slíkan mentanararv, og at taka tey við í umsitingina av hesum.

# IV. Altjóða verja av siðaarvinum

*Grein 16 – Umboðandi listin yvir siðaarv mannaættarinnar*

1. Fyri at tryggja at siðaarvurin er sjónligur og fyri at tryggja størri tilvit um siðaarvin og tess týdning, og fyri at eggja til samskifti sum virðismetir mentanarligt margfeldi, skal Nevndin vegna limalondini gera, dagføra og almannakunngera ein umboðandi lista yvir siðaarv mannaættarinnar.

2. Nevndin greiður úr hondum og leggur fram treytirnar fyri at gera, dagføra og almannakunngera umboðandi listan fyri Aðalfundin.

*Grein 17 – Listi yvir siðaarv, sum hevur bráðneyðugan tørv á verju*

1. Fyri at taka hóskandi fyriskipanir í nýtslu fyri at verja siðaarv, ger, dagførir og almannakunnger Nevndin ein lista yvir siðaarv, sum hevur bráðneyðugan tørv á verju, og Nevndin skal skráseta slíkan siðaarv á listan eftir áheitan frá viðkomandi limalandi.

2. Nevndin greiðir úr hondum og leggur fram treytirnar fyri at gera, dagføra og almannakunngera hendan listan fyri Aðalfundinum at góðkenna.

3. Í serligum førum har tað hevur bráðskund – tær partsleysu treytirnar fyri hesum skulu góðkennast av Aðalfundinum eftir uppskoti frá Nevndini – kann Nevndin skráseta ein part av siðaarvinum, ið tað viðvíkir, á listan nevndur í stk. 1, í samráði við viðkomandi limaland.

*Grein 18 – Ætlanir, verkætlanir og virksemi til verju av siðaarvinum*

1. Grundað á tey uppskot, sum limalondini eru komin við og lúka treytirnar, sum Nevndin hevur sett og Aðalfundurin hevur góðkent, skal Nevndin javnan velja út og kunna um tjóða-, landsparta- og staðbundnar ætlanir, verkætlanir og virksemi til verju av siðaarvinum, eftir hvussu Nevndin metir hesi best enduspegla aðalmál og endamál hjá sáttmálanum við fyriliti fyri serliga tørvinum hjá menningarlondunum.

2. Til hetta fær, kannar og góðkennir Nevndin áheitanir frá limalondum um altjóða stuðul fyri at fyrireika at leggja fram slík uppskot.

3. Nevndin fylgir við gongdini í slíkum verkætlanum, ætlanum og virksemi og miðlar skilabestu mannagongdirnar fyri teimum.

# V. Altjóða samstarv og stuðul

*Grein 19 – Altjóða samstarv*

1. Í hesum sáttmála verður altjóða samstarv millum annað at skilja sum samskifti og samstarv um upplýsingar og royndir, felags átøk og viðtøku av stuðuli til limalond í teirra roynd at verja siðaarvin.

2. Uttan at tað skal avmarka ásetingarnar í viðkomandi landsins lógum, vanligum lógum og mannagongdum viðurkenna limalondini at verju av siðaarvinum er gott fyri menniskjuna og binda seg til at samstarva á sínámillum, staðbundið, landsparta- og á altjóða støði.

*Grein 20 – Endamál við altjóða stuðuli*

Altjóða stuðul kann verða veittur til hesi endamál:

c) *verja av siðaarvi, sum er skrásettur á listanum yvir siðaarv, sum hevur bráðfeingis tørv á verju,*

d) *gerð av skráum sambært grein 11 og 12,*

e) *stuðul til ætlanir, verkætlanir og tiltøk í egnum landi og øki, sum eru til verju av siðaarvinum,*

f) *onnur endamál, sum Nevndin metir vera neyðug.*

*Grein 21 – Slag av altjóða stuðuli*

Stuðulin, sum verður veittur til eitt limaland, er sambært áður nevndu rakstrarfyriskipan í grein 7 og sambært avtaluni, sum er nevnd í grein 24, og kunnu vera veittur til hesi endamál:

a) *kanningar í sambandi við ymisk verjutiltøk,*

b) *veita serkøna hjálp,*

c) *útbúgva lyklastarvsfólk,*

d) *at evna til mannagongdir og aðrar fyriskipanir,*

e) *at seta í verk og rakstur av undirstøðuskipan,*

f) *at veita útgerð og vitan,*

*g) annað slag av fíggjarligum og tøkniligum stuðuli, íroknað at veita lán við lágari rentu, har tað er hóskandi, og at geva peningagávur.*

### *Grein 22 – Regulering av altjóða stuðuli*

1. Nevndin ger mannagongdina fyri at kanna umsóknirnar um altjóða stuðul og útgreinar, hvørjar upplýsingar skulu vera í umsóknini, t.d. ætlaðar verkætlanir og neyðug tiltøk umframt ein kostnaðarmeting av hesum.
2. Í serligum føri viðger Nevndin umsóknir um stuðul sum skundmál.
3. Fyri at kunna viðgera umsóknina og koma til eina niðurstøðu um hana fremur Nevndin tær neyðugu kanningarnar og hoyringarnar.

### *Grein 23 – Umsókn um altjóða stuðul*

1. Øll limalond kunnu søkja Nevndina um altjóða stuðul til verju av siðaarvinum í teirra økjum.
2. Ein slík umsókn kann vera frá tveimum ella fleiri limalondum í felag.
3. Umsóknin skal umframt øll neyðug skjøl, eisini hava veitt upplýsingar, sum eru kravdir í grein 22, stk. 1.

### *Grein 24 – Leikluturin hjá tí, sum fær stuðul*

1. Sambært viðtøkunum í hesum sáttmálanum skal altjóða stuðulin skipast sambært avtalu millum tann, sum fær stuðulin og Nevndina.
2. Meginreglan er hon at tann, sum fær stuðulin sjálvur - alt eftir hvussu fíggjarliga orkan er – skal fíggja part av útreiðslunum til verjutiltøkini, sum hann hevur fingið altjóða stuðul til.
3. Tann, sum fær stuðulin skal gera eina frágreiðing til Nevndina, sum lýsir hvussu stuðulin er nýttur til verju av siðaarvinum.

# VI. Grunnurin fyri siðaarvin

*Grein 25 – Grunnurin, slag og tilfeingi*

1. Hervið verður ein grunnur settur á stovn til verju av siðaarvinum, hereftir nevndur “Grunnurin”.

2. Fíggjarliga tilfeingið í Grunninum er inngjøld sambært fíggjarviðtøkunum hjá UNESCO.

3. Tilfeingið hjá Grunninum eru:

   a) *inngjøld frá limalondum*

   b) *fíggjarligur stuðul, sum aðalfund hjá UNESCO veitir,*

   c) *annar møguligur stuðul, gávur, ella arvabræv frá:*

      i. *øðrum limalondum,*

      ii. *felagsskapum og stevnum undir ST, serliga menningarætlanini hjá ST og øðrum altjóða felagsskapum,*

      iii. *almennum ella privatum stovnum ella privatpersónum,*

   d) *allar rentur av ognum Grunsins*

   e) *inntøkur frá innsamlingum og tiltøkum, sum eru skipað til frama fyri Grunnin,*

   f) *alt annað tilfeingi, sum viðtøkur Grunsins, sum Nevndin ger, loyva.*

4. Nevndin ger við støði í leiðreglunum hjá Aðalfundinum av, hvussu tilfeingið hjá Grunninum skal nýtast.

5. Nevndin kann góðtaka fíggjarligan stuðul og annað slag av stuðli til yvirskipað ella serlig endamál, sum hava við ávísar verkætlanir at gera, treytað av at hesar verkætlanir eru góðkendar av Nevndini.

6. Stuðul skal vera óheftur politiskt, fíggjarligt og í aðrar mátar, sum ikki sampakkar við endamálið í hesum sáttmála.

*Grein 26 – Inngjøld frá limalondum í grunnin*

1. Limalond binda seg til, tó uttan at hetta hevur við sær fleiri sjálvboðin inngjøld, í minsta lagi at gjalda eitt ávíst gjald til grunnin annaðhvørt ár. Støddin á hesum inngjaldi verður roknað eftir einum føstum prosenti, sum er tað sama fyri øll limalondini, og sum verður ásett av Aðalfundinum. Hendan aðalfundaravgerð verður viðtikin av einum meiriluta av limalondunum, sum eru til staðar og atkvøða, og sum ikki hava hava ta í stk. 2 nevndu váttan. Inngjaldið hjá hvørjum limalandi skal ongantíð fara upp um 1% av inngjaldinum til fíggjarætlanina hjá UNESCO.

2. Tó kunnu øll limalond, sum eru nevnd í grein 32 og 33 saman við staðfestingar-, samtykkis-, góðkenningar- ella undirtøkuløgskjali vátta, at limalandið ikki verður bundið av ásetingini í stk. 1.

3. Øll limalond, sum hava samtykt váttanina, sum er nevnd í stk. 2, eiga at miða ímóti at afturkalla hesa váttan við fráboðan til aðalsskrivaran hjá UNESCO. Ein afturtøka av einari slíkari váttan hevur onga ávirkan á gjaldið hjá limalandinum fyrr enn á næsta aðalfundi.

4. Fyri at Nevndin skal kunna leggja sítt virksemi til rættis so væl sum gjørligt, skulu tey limalond, sum hava givið ta í stk. 2 nevndu váttan, eisini gjalda regluliga og í minsta lagi annaðhvørt ár, og skulu vera so lík sum gjørligt teimum inngjøldum, sum tey áttu at havt goldið, um tey ikki vóru bundin av ásetingunum í stk.1.

5. Limalond, sum ikki hava goldið kravda gjaldið ella tað sjálvbodna gjaldið í verandi ári, og heldur ikki fyri undanfarna kalendaraár, kunnu ikki vera vald í Nevndina. Hendan ásetingin er ikki galdandi fyri tað fyrsta valið til Nevndina. Valtíðarskeiðið hjá einum limalandi, sum longu er limur í Nevndini, endar tá tey valskeið, sum eru nevnd í grein 6 í hesum sáttmála, enda.

*Grein 27 – Onnur sjálvboðin inngjøld til grunnin*

Limalond, sum sjálvboðin vilja stuðla meiri enn inngjøldini, sum eru lýst í grein 26, skulu boða Nevndini frá hesum skjótast gjørligt, so nevndin kann leggja arbeiðið til rættis eftir hesum.

*Grein 28 – Altjóða peningainnsavnan*

Limalond skulu stuðla altjóða peningainnsavningartiltøkum, sum eru samskipað í UNESCO høpi til gagns fyri grunnin.

# VII. Frágreiðingar

*Grein 29 – Frágreiðingar frá limalondum*

Limalondini skulu senda inn frágreiðingar um lógar-, fyriskipanar- og onnur tiltøk, sum verða sett í verk fyri at seta í verk hendan sáttmála til Nevndina við atliti at tí reglusemi og fyrimynd, sum er ásett av Nevndini.

*Grein 30 – Frágreiðingar frá Nevndini*

1. Við grundarlagi í teimum frágreiðingum, sum limalondini senda inn sambært grein 29, skal Nevndin gera eina frágreiðing til hvønn aðalfund.

2. Aðalfund hjá UNESCO skal verða kunnað um innihaldið í frágreiðingunum.

# VIII. Tillagingaráseting

*Grein 31 – Yvirlýsingin um meistarverk í menniskjans munnliga arvi og siðaarvi*

1. Nevndin skal seta inn teir lutir, sum eru mettir at vera "meistaraverk í menniskjans munnliga arvi og siðaarvi" í skránna, sum umboðar mannaættarinnar siðaarv, áðrenn hesin sáttmáli kemur í gildi.

2. Skrásetingin av hesum lutum í skránna yvir mannaættarinnar siðaarv eigur ikki á nakran hátt at ávirka metingarstøði á skrásetingum í skránna framyvir, sambært grein 16, stk. 2.

3. Fleiri yvirlýsingar verða ikki gjørdar eftir at hesin sáttmáli verður settur í gildi.

# IX. Endaligar viðmerkingar

*Grein 32 – Staðfesting, samtykki ella góðkenning*

1. Hesin sáttmáli skal staðfestast, samtykkjast ella góðkennast av limum í UNESCO sambært mannagongd í avvarandi stýrisskipan.

2. Staðfestingar-, samtykkis- ella góðkenningarløgskjølini skulu vera latin aðalskrivaranum í UNESCO í varðveitslu.

*Grein 33 – Undirtøka*

1. Hesin sáttmálin er opin fyri viðtøku av øllum londum, sum ikki eru limir í UNESCO, men sum av Aðalfundinum í UNESCO eru heitt á at samtykkja sáttmálan.

2. Hesin sáttmáli tekur eisini ímóti londum, sum hava fult innanhýsis sjálvstýri og sum eru viðurkend av Sameindu Tjóðum, men sum enn ikki hava fingið fult sjálvstýri sambært aðalfundarfrásøgn 1514 (XV), og sum hava førleikar á teimum økjum, sum hesin sáttmáli hevur við at gera, íroknað førleikar at gera sáttmálar á hesum øki.

3. Undirtøkuløgskjalið skal í varðveitslu hjá aðalskrivaranum í UNESCO.

*Grein 34 – Gildiskoma*

Hesin sáttmáli kemur í gildi tríggjar mánaðir eftir at 30. staðfestingar-, samtykkis- ella góðkenningarløgskjalið ella undirtøkuløgskjalið er latið í varðveitslu, men bert fyri tey lond, sum áðrenn hendan dag ella á hesum degi hava latið teirra staðfestingar-, samtykkis- ella góðkenningarløgskjal ella undirtøkuløgskjal í varðveitslu. Fyri øll onnur lond er sáttmálin galdandi tríggjar mánaðir eftir at teirra staðfestingar-, samtykkis- ella góðkenningarløgskjal ella undirtøkuløgskjal er latið í varðveitslu.

*Grein 35 – Samveldis- ella eindarríkisstjórnarskipanir*

Hesar ásetingar eru galdandi fyri limalond við samveldis- ella eindarríkisstjórnarskipan:

a) *tá tað kemur til ásetingarnar í hesum sáttmála, sum lóggevandi samveldis- ella meginfyrisiting standa fyri, binda tær samveldis- ella meginstjórnina á sama hátt sum tær binda limalondini, sum ikki eru samveldi.*

b) *tá tað kemur til ásetingarnar í hesum sáttmála, sum verða stýrdar av eindunum í einstøkum statum, londum, landspørtum ella øki, sum ikki hava skyldu at taka avgerðir um tiltøk innan lóggávuøkið sambært teirra stjórnarskipan, upplýsir samveldismyndugleikin viðkomandi myndugleikar í tílíkum statum, londum, landspørtum ella øki um fyriskipanirnar saman við síni áheitan um at taka undir við hesum.*

*Grein 36 – Uppsøgn*

1. Øll limalond kunnu siga hendan sáttmálan upp.

2. Uppsøgnin verður fráboðað skrivliga í einum løgskjali, sum verður latið aðalskrivaranum í UNESCO í varðveitslu.

3. Uppsøgnin kemur í gildi tólv mánaðir eftir at uppsagnarløgskjalið er móttikið. Hon broytir á ongan hátt fíggjarligu skyldirnar, sum uppsigandi parturin hevur fram til dagin, tá uppsøgnin kemur í gildi.

*Grein 37 – Skyldur hjá vørslupersóni*

Aðalsskrivarin í UNESCO hevur sum vørslupersónur í hesum sáttmála skyldu at kunna limalondini í UNESCO, tey limlond, sum ikki eru limir sambært grein 33, umframt Sameindu tjóðir um at tey í grein 32 og 33 nevndu staðfestingar-, samtykkis- ella góðkenningarløgskjøl ella undirtøkuløgskjøl eru latin í varðveitslu og um uppsagnir sambært grein 36.

*Grein 38 – Broytingar*

1. Øll limalond kunnu við skrivligari fráboðan til aðalskrivaran koma við uppskoti til broytingar í hesum sáttmála. Aðalskrivarin sendir slík uppskot víðari til øll limalondini. Um í minsta lagi helmingurin av limalondunum innan seks mánaðir aftaná at uppskotið er komið teimum í hendur koma við einum jaligum svari, leggur aðalskrivarin uppskotið til umrøðu og møguliga viðtøku á næsta aðalfundi.

2. Uppskot um broytingar verða viðtikin, um tveir triðingar av limalondunum, sum eru á fundinum og atkvøða, taka undir við hesum.

3. Tá broytingar í hesum sáttmála eru viðtiknar, skulu tær staðfestast, samtykkjast, góðkennast ella verða settar í gildi í limalondunum.

4. Fyri tey limalond, sum hava staðfest, samtykt, góðkent ella mælt til broytingar í hesum sáttmála, koma hesar í gildi tríggjar mánaðir aftaná at tveir triðingar av viðkomandi limalondum hava latið tey í stk. 3 nevndu løgskjøl í varðveitslu. Hereftir, fyri øll onnur limalond, sum eftir hetta staðfesta, samtykkja, góðkenna ella mæla til broytingar kemur hendan í gildi tríggjar mánaðir aftaná, at viðkomandi limaland hevur latið sítt staðfestingar-, samtykkis-, góðkenningar- ella undirtøkuløgskjal í varðveitslu.

5. Mannagongdin í stk. 3 og 4 er ikki galdandi í grein 5, sum snýr seg um talið á limum í Nevndini. Hesar broytingar koma í gildi, tá tær eru viðtiknar.

6. Eitt land, sum gerst partur av hesum sáttmála eftir at broytingar sambært stk. 4 eru komnar í gildi, verður – um landið ikki hevur biðið um annað – at meta sum:

7. partur í hesum sáttmála við broytingum og

8. partur í hesum sáttmála uttan broytingar, sum galda limalond, sum ikki eru bundin at hesum broytingum.

*Grein 39 – Gildugur sáttmáli*

Hesin sáttmáli eru skrivaður á arabiskum, kinverskum, enskum, fronskum, russiskum og sponskum og sáttmálin á hesum seks málunum hevur sama gildi.

*Grein 40 – Skráseting*

Sambært grein 102 í Sameindu tjóða sáttmálanum verður hesin sáttmáli skrásettur í avgreiðslustovuni hjá Sameindu tjóðum eftir áheitan frá aðalskrivaranum í UNESCO.

FYLGISKJAL 2

# Etiskar meginreglur til verju av siðaarvinum

*Etisku meginreglurnar til verju av siðaarvi* eru evnaðar til við støði í andanum, sum er í *Sáttmálanum um verju av siðaarvi frá 2003* og verandi altjóða ásetingum um verju av mannarættindum og rættindum hjá upprunafólki. Tær umboða yvirskipaðar meginreglur, sum víða um verða mettar at vera góðar mannagongdir hjá stýrum, felagsskapum og einstaklingum, sum beinleiðis ella óbeinleiðis ávirka siðaarvin fyri at verja hann, og harvið at viðurkenna ávirkanina, sum hann hevur á frið og burðardygga menning. Umframt *Sáttmálan um verju av siðaarvi frá 2003*, *Nýtslugerð til at seta sáttmálan í verk* og lógarkarmar í londunum, eru hesar *Etiskar meginreglur* ætlaðar sum grundarlag fyri menningina av etiskum reglum og amboðum, sum er lagað til tjóðar- og økisumstøður.

1. Samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar eiga at hava **høvuðsábyrgdina** av at verja teirra egna siðaarv.

2. **Samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar hava rættindini** at halda áfram við **útinnan**, umboðan, framsøgn, vitan og neyðugu førleikunum at tryggja viðurkenning av og virðing fyri siðaarvinum framyvir.

3. **Sínámillum virðing** eins og virðing fyri og sínámillum viðurkenning av siðaarvinum eigur at ráða millum lond og millum samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar.

4. Samskiftið við samfeløgini, bólkarnar og, har tað er hóskandi, einstaklingarnar, sum skapa, verja, viðlíkahalda og bera víðari siðaarv skal vera eyðkent við **gjøgnumskygdum** samstarvi, samskifti, samráðingum og ráðgeving og treytað av teirra **sjálvbodna, undanfarna, framhaldandi og upplýsta samtykki**.

5. Samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar skulu hava tryggjaða **atgongd** til tey amboð, lutir, gripir, mentanar- og náttúrustøð, og støð, ið bera í sær minni og sum eru alneyðug fyri at orðbera siðaarvin, sjálvt undir umstøðum, har vápnað stríð er. Vanligar mannagongdir galdandi fyri atgongdina til siðaarvin eiga altíð at vera virdar, sjálvt tá hesar kunnu avmarka almenna atgongd.

6. **Øll samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar eiga at meta um virðið á teirra siðaarvi og hesin siðaarvur eigur ikki at vera virðismettur av uttanhýsis metarum**.

7. Samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar, sum skapa siðaarvin, eiga at verða **vard gjøgnum moralska og ítøkiliga áhuganum**, sum er í slíkum siðaarvi, serliga hvussu hesin verður brúktur, granskaður, skjalprógvaður, lýstur ella tillagaður av samfelagnum ella øðrum.

**8. Broytiligi og livandi andin í siðaarvinum** eigur **áhaldandi** at verða virdur. Sanngildi og serrættur skal ikki vera ein trupulleiki ella forðing fyri at verja siðaarvin.

9. Samfeløg, bólkar, staðbundin, lands og tvørtjóða felagsskapir og einstaklingar eiga neyvt at meta um beinleiðis og óbeinleiðis, stutttíðar og langtíðar, møgulig og ivaleys árin av einhvørjari avgerð, sum kann ávirka lívførið í siðaarvinum ella avvarandi samfelagi sum útinna hann.

10. Samfeløg, bólkar og, har tað er hóskandi, einstaklingar eiga at hava avgerandi leiklut í at meta um, hvat kann vera ein **hóttan mótvegis teirra siðaarvi**, íroknað tá hann verður tikin úr samanhangi, tá hann gerst ein handilsvøra og tá hann verður skeivt útlagdur, umframt at meta um, hvat skal gerast fyri at forða fyri og avmarka slíkar hóttanir.

**11. Mentanarligt fjølbroytni** og samleikin, sum er í einum samfelagi, bólki og einstaklingi eiga altíð at vera vird. Við virðing fyri teimum normum og virðum, sum eru í einum samfelagi, bólki og einstaklingi, eigur eitt serligt atlit at vera tikið til javnstøða millum **kynini**, at fáa tey **ungu** við og at **virða tjóðbólkaeyðkenni**, tá verjutiltøk verða sett í verk.

12. Verja av siðaarvi er **til frama fyri alla mannaættina** og eigur tí at vera farið undir hesa við sínámillum samstarvi millum lond, landspartar, øki og altjóða partar; tó skulu samfeløg, bólkar, og har tað er hóskandi, einstaklingar ongantíð fremmandgerast frá teirra egnu siðaarvi.